# AÐALFUNDUR HJÁ KOMMUNUFELAGNUM

# 2020

Kommunufelagið



Útgevari: Kommunufelagið
Uppseting: Nudlavirkið
Myndir: Ólavur Frederiksen, Faroephoto
Tekning: Jonas Feldfoss Gaardlykke Rossum
Prent: Føroyaprent
Svanamerktur prentlutur 541 705

*Tjørnuvík*

# Innihaldsyvirlit

1. Vælkomin . . . . . . 4
2. Ábyrgdarøki millum land og kommunur . . . . . . 5
3. Onnur mál av áhuga . . . . . . 7
4. Felagið innanhýsis . . . . . . 11
5. Átøk í sambandi við Covid 19 . . . . . . 13
6. At enda . . . . . . 14
7. Kommuna og kommunuhugtakið . . . . . . 24
8. Úrslit 2019 og høvuðstøl . . . . . . 26
9. Búskaparligu útlitini . . . . . . 27
10. Inntøkur . . . . . . 30
11. Rakstrarútreiðslur . . . . . . 36
12. Íløgur . . . . . . 37
13. Fíggjarstøðan . . . . . . 38
14. Gongdin í fólkatalinum . . . . . . 40
15. TEMA Búskaparligi bygnaðurin hjá kommununum . . . . . . 46



*Miðbýurin í Tórshavn flaggdagin 2020*

# 1. Vælkomin

Góðu kommunustýrislimir, gott fundarfólk.

Eg skal við hesum bjóða tykkum hjartaliga vælkomin á aðalfund hjá Kommunufelagnum.

Valskeiðið er um at vera runnið, og fyri onkur okkara er hetta møguliga seinasta árið sum kommunustýrislimur. Nøkur velja ikki at stilla uppaftur, onnur verða kanska ikki afturvald.

Ilt er at meta um, hvussu framtíðin fer at laga seg, men vit vita, at árið 2020 fara vit at minnast í langa tíð frameftir. Ikki akkurát fyri kommunal viðurskifti, men sum árið tá heimsfarsóttin Covid 19 herjaði kring allan knøttin – og farsóttin fær í síðsta enda eisini stórar avleiðingar fyri føroysku kommunurnar.

Í desember 2019 vóru fyrstu tilburðirnir av coronavirus, sum ikki áður hava verið at sæð hjá menniskjum, staðfestir í Kina. Teir fyrstu tilburðirnir vórðu í Wuhan í Hubei-landslutinum í eystur Kina. Síðani hevur virusið breitt seg til allan heimin.

Fyrsti tilburðurin var staðfestur í Føroyum 3. mars. 12. mars vóru 3 tilburðir. Síðani vaks talið fram til 16. mars, tá ið 19 tilburðir vórðu staðfestir eftir einum degi. Síðani hevur talið av smittaðum verið minkandi, og seinasti staðfesti tilburðurin í Føroyum var 22. apríl.

Covid 19 hevur havt víðfevndar avleiðingar fyri alt føroyska samfelagið. 12. mars boðaði landsstýrið frá, at umfatandi tiltøk vórðu sett í verk. Millum annað varð virksemið á dagstovnum munandi minkað, røktarheim og sambýli vórðu stongd fyri vitjandi, og samfelagið annars varð meira og minni lagt lamið.

Ilt er at spáa um framtíðina. Tað mugu vit ásanna í hesum døgum.

Mánadagin 2. mars legði Búskaparráðið fram várfrágreiðingina. Fyri 2020 metti Búskaparráðið saman við Hagstovuni, at vøksturin í BTÚ var 7,0%. Samstundis vóru metingarnar fyri 2019 dagførdar, og roknað var við einum vøkstri á 9 % fyri 2019

Bert 6 vikur seinni, hin 15 apríl legði Fíggjarmálaráðið eina frágreiðing fram um fíggjarligu avleiðingarnar av Covid 19. Nú verður mett, at afturgongd trúliga verður í búskapinum í 2020 og møguliga eisini í 2021. Mett verður, at búskapurin kann minka við 3-10% í 2020. Vit kunnu siga við vissu, at minkingin í heimsbúskapinum verður stór, men í roynd og veru veit ongin enn at siga, hvussu hart hesi sveiggini koma at raka samfelag okkara. Livst, so spyrst, og vónandi ber til at taka samanum á aðalfundinum í 2021, hvør okkara so verður við tá.

Tvey tey seinastu árini hava vit gjørt eitt ískoyti til ársfrágreiðingina, sum viðgjørdi kommunala búskapin. Ætlanin er, at hetta við tíðini skal gerast ein búskaparfrágreiðing, sum burturav viðger kommunala geiran. Vit vóna, at hon við tíðini verður ment til eina fjøltáttaða kommunala búskaparfrágreiðing, sum verður almannakunngjørd á hvørjum ári.

Enn einaferð hjartaliga vælkomin á aðalfund hjá Kommunufelagnum.



# 2. Ábyrgdarbýtið millum land og kommunur

Løgtingsval var 31. august 2019. Trupulleikin við at skilja ímillum ábyrgdina hjá landinum og hjá kommununum kom serliga væl til sjóndar í valstríðnum.

Nógv av vallyftunum høvdu stóra ávirkan á kommunala geiran. Vit kunnu nevna: Skattalættar til láglønt og miðalønt, skattafrítt útgjald úr Samhaldsfasta, frádrátt fyri limagjald til yrkisfeløg, at áseta normeringar á eldra– og dagstovnaøkinum, at áseta sama tænastustøði um alt landið, styttri arbeiðsvika, fyrireikingartíð í dagstovnunum o.s.fr.

Lagt varð upp til, at løgtingið yvirskipað skuldi stýra kommunal málsøki niður í smálutir, samstundis sum vallyftini høvdu stórar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunukassarnar.

Virksemið í kommununum er fyrst og fremst fíggjað av persónsskatti. Økjast útreiðslurnar munandi og minkar inntøkugrundarlagið um somu leið, so verður neyðugt at hækka kommunuskattin. Tá er einki vunnið hjá tí einstaka.

Kommunufelagið heitti tí á politisku flokkarnar og valevni teirra um at vísa hesum ans og koma við heildarloysnum, sum taka hædd fyri bæði inntøkum og útreiðslum, heldur enn bert at koma við uppskotum, sum minka um inntøkurnar og økja um útreiðslurnar hjá kommununum. At fara til løgtingsval við dagskrá, ið raðfestir grundarlagið undan kommunukassunum er lítið virðiligt.

Kommunufelagið heitti á flokkarnar um greitt at boða frá, hvussu teir grundleggjandi ynskja, at viðurskiftini millum land og kommunur verða skipað í framtíðini, og undir hvørjum fyritreytum kommunurnar í framtíðini skulu reka yvirtikin málsøki.

Valstríðið lýsti rættiliga væl størsta trupulleikan hjá kommunala geiranum: Tvørrandi virðingin hjá landspolitikarum fyri kommunala sjálvræðinum, og vantandi kunnleikin til meginreglurnar um greitt ábyrgdarbýti.

## Meginreglur

Í samráðingum og samskiftinum millum land og kommunur hevur semja altíð verið um, at eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur er ein fyritreyt fyri einum vælvirkandi almennum geira. Millum annað vóru eldraøkið og barnaverndarøkið løgd kommununum við tí fyri eyga, at fáa greiðari býti millum land og kommunur, tí mett varð, at bert soleiðis kundi borgarin fáa eina munagóða tænastu, og bert soleiðis tryggjaðu vit fólkaræðisligt gjøgnumskygni – og tænastur, ið eru grundaðar á tørvin á staðnum.

Land og kommunur hava eisini verið samd um tær meginreglur, sum eiga at vera grundarlagið undir strembanini eftir at fáa greitt ábyrgdarbýti millum politisku myndugleikarnar í okkara fólkaræði. Men tað tykist, at tá ið til stykkis kemur, so virðir landsins stjórn ikki hesar meginreglur.

Orðingar sum, *tað er sami skattgjaldari, sum kortini rindar, og kommunurnar eru væl fyri fíggjarliga,* verða brúktar sum undanførslur fyri at leggja eyka útreiðslur á kommunurnar.

Meginreglurnar eru annars greiðar. Í sonevnda *Grøna Álitinum* frá 2001 verður fyrsta meginreglan fyri einum greiðum ábyrgdarbýti orðað soleiðis:

*Meginregla 1*
*"Er ein uppgáva kommunal, so skal kommunan fíggja hesa uppgávu, og er tað harafturímóti ein landsuppgáva, so skal landið eisini fíggja hesa uppgávu. Hetta hevur við sær, at bara tey, ið taka avgerðir, kunnu áleggja sær sjálvum fíggjarligu ábyrgdina av avgerðunum. Tryggjast skal, at tey, ið hava ábyrgdina, ikki kunnu sleppa sær undan við onki at gera, ei heldur at leggja útreiðslur á onnur við at lata standa til. At uppgávur og ábyrgd fylgjast ger, at borgarin betur er førur fyri at skyna á, hvat tað kommunala virksemið í roynd og veru kostar. Við hesum kann borgarin seta strangari krøv til nýtsluna av skattakrónum sínum." (Staðfesting og raðfesting av uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, 2001, s. 83.)*

Í álitinum *Kommunur, eindir og uppgávur* frá 2009 verður týdningurin av einum greiðum ábyrgdarbýti millum geirarnar eisini undirstrikaður:

*"Eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti er týdningarmikið í einum umboðandi fólkaræði sum okkara. Landspolitikarar og kommunupolitikarar eru ofta í kapping um at taka sær æruna av teimum framstigum, ið henda, og somu politikarar eru skjótir at lasta hvønn annan fyri tað, sum virkar minni væl. Veljarin eigur í einum fólkaræði at kunna krevja politikararnar til ábyrgd fyri førda politikkin. Men í eini skipan við ógreiðum og umskarandi heimildum veit veljarin ikki, hvør politisk og umsitingarlig eind – land ella kommuna, ið er rætti myndugleiki at rætta mistøk. Lokalpolitikarin og landspolitikarin turka av upp á hvønn annan, og borgarin stendur á berum.*

*Ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýti er eisini tvørrandi og uppslítandi fyri samstarvið millum land og kommunur" (Kommunur, eindir og uppgávur, 2009, s. 53.)*

Hetta eru meginreglur, sum eitt og hvørt landsstýri átti at havt virðing fyri. Sitandi landsstýrið, eins og undanfarin landsstýrið, tykjast tó tíverri áhaldandi ikki at vísa hesum meginreglum ans, tá ið lógaruppskot verða til-evnað.




## Skattalættar úr kommunukassunum

Hetta landsstýrið byrjaði valskeiðið við at lata lættar úr kommunukassunum.

Umvegis uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) varð Skattafrádráttur á kr. 6.000 um árið latin fólkapensjónistum.

Skattalættin fer at kosta kommununum 12 mió. kr. í 2020 og 12 mió. kr. í 2021, t.v.s. 24 mió. kr. um árið frá 2021 og frameftir. Saman við tingmáli 12/2019 (Frádráttur til lærlingar á 50.000 kr.) samtykti løgtingið skattalættar á 34 mió. kr. um árið beinleiðis úr kommunukassunum. Saman við skattalættanum til fyritíðarpensjónistar, sum undanfarna løgting samtykti, hevur løgtingið bara hesi seinastu 2 árini samanlagt samtykt lættar fyri omanfyri 60 mió. kr. beinleiðis úr kommunukassunum. Hesar 60 mió. kr. kundi verið brúktar til at raðfest øki, sum kommunurnar varða av t.d. dagstovna- ella eldraøkið. Ella kundu 60 mió. kr. verið latnar beinleiðis sum skattalætti til allar borgarar í kommununum.

Neyðugt er at undirstrika, at allir lættar nevndir omanfyri saktans kundu verið fíggjaðir av landskassanum burturav, um vilji var til tess hjá landsstýri og løgtingi. – Tað var ikki av ongum, at fedrarnir javnan (á donskum) tóku til hettar brotið úr sálminum “Hin harða krossin til ta síðstu hvílu”, sum okkum ikki untist at syngja saman í kirkjunum um hesar páskirnar: “Det er så let at lægge kors på andre, det er så tungt med korset selv at vandre”

Men vit kunnu ikki sláa okkum til tols við hesi gomlu sannroynd: Hendan áhaldandi landspolitiska undanstøkkingin og útgjaringin er helst størsta einstaka hóttanin móti kommunala fólkaræðinum yvirhøvur, og tí er tvingandi neyðugt, at allir kommunupolitikarar standa saman um at stríðast áhaldandi. til vend kemur í.



# 3. Onnur mál av áhuga

Uppgávurnar hjá kommununum eru fjøltáttaðar, og virksemið hjá Kommunufelagnum endurspeglar í stóran mun hetta. Virksemi felagsins fevnir bæði um ítøkiliga at geva kommunalu fyrisitingunum ráð, og at hjálpa við málsviðgerð innan tey málsøki, ið kommunurnar røkja. Haraftrat tekur felagið lut í ymiskum virksemi, sum hevur felags kommunalan áhuga, og har felagið gjøgnum sína luttøku kann ávirka, hvussu øki og lóggáva verða ment og skipað.

Niðanfyri er ein stuttur samandráttur av nøkrum av teimum málum, sum arbeitt hevur verið við seinasta árið.

## Eldraøkið

Tá ið ábyrgdin fyri eldraøkinum var løgd kommununum 1. januar 2015, varð ásett í lógarpakkanum, at lógirnar, sum skipa eldraøkið, skuldu endurskoðast fimm ár eftir, at lógirnar vóru settar í gildi. Hetta fyri at meta um, hvørt lógirnar virka eftir ætlan, ella um broytingar skulu gerast í skipanini. Eftirmetingin eigur at fevna um afturberingarleistin, markamótini millum land og kommunur, kommunalu samstarvsøkini og mannagongdir, tá ið røktarkrevjandi borgarar flyta millum kommunurnar.

Landsstýriskvinnurnar, Eyðgunn Samuelsen, Sirið Stenberg og Kristina Háfoss boðaðu í tíðindaskrivi dagfest 4. desember 2017 frá, at eftirmetingin skuldi framskundast og gerast longu fyrst í 2018.

Serliga var tað afturberingarleisturin, markamótini millum land og kommunu og kommunalu samstarvsøkini, sum skuldu eftirmetast, og hetta skuldi gerast í tøttum samstarvi millum land og kommunur. Men eftir tíðindaskrivið hendi lítið og einki.

Landsstýriskvinnan í almannamálum tók táttin upp eftir undanfarnu landsstýriskvinnu, og helt fram við at arbeiða við nýggjari vælferðarlóg, og í hesum sambandi eisini við broytingum í eldralóggávuni.

Kommunufelagið tekur sjálvsagt undir við, at lóggávan á almannaøkinum verður dagførd. Kommunufelagið hevur tó mótvegis sitandi landsstýri, eins og undanfarna, víst á, at sambært lóg um heimatænastu og eldrarøkt er ásett, at lóggávan skal verða eftirmett í 2020, og at hetta skal gerast í samráð við Kommunufelagið. Tískil góðtekur felagið ikki, at landsstýrið einvíst tekur stig til at gera broytingar, sum møguliga eiga at koma sum úrslit av eini eftirmeting. Felagið tekur heldur ikki undir við ætlaðu broytingum í eldralógini, tí mett verður ikki, at hesar eru í samsvari við yvirskipaða ábyrgdarbýtið, sum er gjørt millum land og kommunur á økinum – sum eisini ein og hvør kundi sagt sær sjálvum, at vandi er fyri, tá landsstýrið velur at halda stóran part av servitanini á økinum uttanfyri.

Hóast ávíst fundarvirksemi hevur verið um ætlaðu eftirmetingina, so metir Kommunufelagið ikki, at gongd enn er komin á nakra veruliga samskipaða eftirmeting av eldraøkinum, sum á ein skipaðan hátt greinar og lýsir allar viðkomandi tættir, grundað á tær royndir, sum eru gjørdar síðani kommunurnar yvirtóku ábyrgdina av økinum.

Kommunufelagið stendur fast við, at eingin broyting skal verða gjørd í lógini, fyrr enn ein eftirmeting er gjørd, sum báðir partar eiga sín lut í.

Í løtuni verður eisini arbeitt við at knýta eldraøkið í talgildu heilsuskipanina Cosmic. Skipanin nøktar tørvin at fáa yvirlit yvir støðuna hjá sjúklinginum, og skipanin verður brúkt til at samskipa og samskifta millum starvsfólk í Heilsuverkinum. Í løtuni eru, umframt sjúkrahúsini, eisini kommunulæknar, Naina, Gigni og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin á Fróðskaparsetrinum við í skipanini.

Við at koma í Cosmic, fæst eisini samlaða sjúkrasøgan hjá tí einstaka. Hetta vil økja um trygdina hjá brúkarum á eldraøkinum, og gagnnýta arbeiðsorkuna hjá teimum starvsfólkum, sum eru um tey eldru.

## Tilmæli um palliatión í Føroyum

Undanfarna landsstýrið setti várið 2019 ein arbeiðsbólk at eftirmeta palliativa tilboðið í Føroyum, og at koma við tilmæli um, hvussu palliativa arbeiðið skuldi skipast frameftir. Hetta arbeiði helt fram undir verandi landsstýri. Heimatænastan undir eldraøkinum er ein týðandi partur av palliativa tilboðnum, og tí eru kommunurnar umboðaðar í arbeiðsbólkinum.

Arbeiðsbólkurin mælti til at styrkja palliativa tilboðið við, at palliatión, sum sergrein og landsumfatandi tænasta, verður skipað í sjúkrahúsverkinum og staðsett á Landssjúkrahúsinum, at ein deild, sum burturav er fyri palliatión, verður stovnsett, og at palliativa toymið skal veita tænastur til bæði sjúkrahúsverkið og primera heilsugeiran. Eisini varð staðfest, at ein fortreyt fyri at veita góða palliativa viðgerð og røkt í primera heilsugeiranum er at gera eina menningarætlan fyri, hvussu heilsustarvsfólk fáa grundleggjandi vitan um palliatión, og at ein menningarleistur til heimatænastuna og til starvsfólk á ellis- og røktarheimunum verður gjørdur. Hetta eigur at verða gjørt í samráð og í samstarvi við palliativu deildina.

Tilmælið hevur ikki fingið politiska viðgerð enn.

## Havnaviðurskifti, óljóð frá skipum

Kommunufelagið hevur, saman við umboðum fyri tær havnir, sum hava trupulleikar við óljóði frá vinnuvirksemi, umrøtt trupulleikan við óljóði frá skipum, og hvussu hesin kann loysast. Hetta vísir seg at vera ein torføra uppgáva, tí trupulleikin er heldur samansettur. Eingin skjót og einføld loysn er tí á hesum.




*Ferðamannaskip á vitjan*

Fundur hevur verið við landsmyndugleikarnar, og landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum hevur sett gongd á arbeiði, ið vónandi kann skunda undir, at trupulleikin verður loystur.

## Nýggj havnareglugerð

Kommunufelagið var, saman við umboðum fyri havnamyndugleikarnar, á fundi í Samferðslumálaráðnum at umrøða tørvin á eini reglugerð viðvíkjandi føroysku havnunum. Tørvurin er ymiskur kring landið, og størstur í teimum havnum, har nógv skipaferðsla og virksemi annars er. Neyðugt er fyri hesi øki at fáa greiðar heimildir at skipa virksemið.

Vegna umleggingar í miðfyrisitingini, hevur landsstýrið niðurraðfest hetta arbeiði í eina tíð, men ætlanin er at seta ferð á aftur arbeiðið í næstum.

Orsakað av støðuni við koronasmittuni, hevur tørvurin hjá kommunalu havnamyndugleikunum at fáa greiðar heimildir at seta kravboð til skip og at avvísa eitt nú ferðamannaskip, víst seg at vera átrokandi.

## Arbeiðsbólkur um at útvega fleiri bústaðir

Spurningurin um, hvønn leiklut kommunur skulu hava á bústaðarmarknaðinum, hevur seinnu árini verið til umrøðu í felagnum. Tað er ein sannroynd, at kommunurnar hava ymiskar avbjóðingar, tá um bústaðarviðurskifti ræður, og tí eru sjónarmiðini eisini samsvarandi ymisk.

Landsstýrið setti beint áðrenn ársenda 2019 ein arbeiðsbólk at gera uppskot um, hvussu útboðið av bústøðum skjótast gjørligt kann økjast kring landið, bæði sum leigu-, luta- og eigarabústaðir. Arbeiðsbólkurin skuldi eisini gera uppskot til alternativar hættir at byggja vardar bústaðir, og uppskot til alternativar fíggingarmøguleikar, ið kunnu seta gongd á bygging av luta- og leigubústøðum, og sum betra um møguleikarnar at seta búgv uttan fyri miðstaðaøkini.

Sjónarmiðini hjá Kommunufelagnum í hesum arbeiði vóru yvirskipað sæð fylgjandi:

Um útboðið av fjøltáttaðum bústaðarmøguleikum skal økjast kring landið, er kommunali leikluturin ein týdningarmikil táttur í hesum arbeiði.

Kommunurnar eru sambært lóggávu skipanarmyndugleikar, byggimyndugleikar og byggieftirlit í mun til tað, sum bygt verður, og tí eru kommunur sentralar í øllum, sum bygt verður.

Harumframt hava kommunur sjálvar tørv á at byggja bústaðir, sum t.d. á eldraøkinum.

Tær uppgávur, sum kommunur á einhvønn hátt eiga at loysa, skulu hava heimild í lóg ella kommunufulltrúini. Soleiðis er eisini við spurninginum um, í hvønn mun kommunur kunnu byggja bústaðir, taka lut í bústaðarverkætlanum annars, langtíðarleiga undirlendið til onnur at byggja á, áleggja møguliga bústaðarskyldu, leggja tænastugjøld á bústaðir, v.m.



Avbjóðingarnar í kommunum eru sum sagt ymiskar, so sum landafrøði, fólkasamanseting, inntøkugrundarlag o.s.fr. Hesi viðurskifti gera seg ikki minst galdandi í avbjóðingini við at skipa bústaðarmarknaðin.

Hóast ymiskar avbjóðingar, so eigur reguleringin av kommunala geiranum altíð at vera soleiðis skipað, at tað er møguligt hjá kommunustýrinum, sum ovasta politiska myndugleika í viðkomandi lokaløki, at gera tær raðfestingar, sum kommunustýrið metir tænir borgaranum í lokalumhvørvinum best.

Samstundis er týdningarmikið at hava í huga, at tær heimildir, sum kommunur hava at virka eftir, tá ræður um at vera við til at føra bústaðarpolitikk, bæði eru so smildligar, at tað er møguligt hjá kommunum at taka virknan lut saman við øðrum viðkomandi aktørum; og samstundis avmarkandi, soleiðis at heimildirnar ikki eru í stríð við aðra lóggávu, sum regulera t.d. kommunala luttøku í vinnuligum virksemi, stuðul til einstaklingar o.t.

Orsakað av samfelagsstøðuni er stígur komin í kjakið um bústaðarpolitisku avbjóðingina, men Kommunufelagið er sannført um, at avbjóðingarnar eru grundleggjandi, og at neyðugt er politiskt at fáa greiði á, hvussu føroyski bústaðarmarknaðurin skal skipast, og hvønn leiklut kommunur í framtíðini skulu hava í tí sambandi.

## Ferðslutrygdarætlanin 2019-2027

Kommunufelagið hevur tikið lut í arbeiðinum við Ferðslutrygdarætlanini 2019-2027, sum Samferðslumálaráðið hevur tikið stig til. Talan er um at endurskoða fyrstu ferðslutrygdarætlanina, ið var galdandi fyri tíðarskeiðið 2007 til 2015.

Í nýggju ætlanini eru 8 fokusøki, býtt á

1. Ov nógv ferð
2. Rúsdrekka, rúsevni og heilivágur
3. Gáloysni
4. Manglandi nýtsla av trygdarbelti og hjálmi
5. Bleyt ferðsla
6. Ungir bilførarar frá 18–24 ár
7. Møtióhapp og stakóhapp
8. Ferðafólk.

Tilmælini í nýggju ferðslutrygdarætlanini eru 70 í tali, býtt á 6 ymisk evni: Vitan, hagtøl og royndir, undirvísing og samskifti, vegurin og vegaumhvørvið, akfarið, lógarverk og revsing, og eftirlit.

Kommunalu vegirnir eru umleið helmingurin av føroyska vegakervinum, og tí er kommunali leikluturin í samlaðu myndini stórur. Tey tilmælini, ið verða mett at hava størstan týdning fyri kommunurnar, eru tí eisini tilmælini innan vegakervið um ferðslutrygdargrannskoðan og ferðslutrygdarætlan.

Ferðslutrygdargrannskoðan er ein reglubundin og óheft gransking av ferðslutrygdarviðurskiftum viðvíkjandi øllum ferðslubólkum í einum nýggjum vega- ella ferðsluverklagi. Endamálið við ferðslutrygdargrannskoðan er at gera nýggjar og umbygdar vegir so tryggar sum gjørligt, áðrenn vegirnir verða bygdir, og áðrenn vanlukkur henda. Ferðslugrannskoðan kann ávísa ferðsluvandamiklar feilir ella manglar við nýggjum vegum og ferðslustýringartiltøkum og viðvirka til, at hesi verða gjørd soleiðis, at væntaðar vanlukkur verða færri.

Kommunurnar arbeiða framvegis við ferðslutrygdarætlanum, sum innan fyri eitt tíðarskeið á t.d. fýra ár, seta fokus á ferðslutrygdarfremjandi átøk á vegunum og gjøgnum atburð.

Kommunurnar fáa gagn av arbeiðnum t.d. vitanini frá hagtølum um títtleika av ferðsluóhappum á ávísum vegastrekkjum í lokalumhvørvinum. Ein vitan, ið kann nýtast, tá kommunal vegakervi verða løgd til rættis.

Yvirskipaða ferðslutrygdarætlanin verður eftir ætlan endurskoðað og leypandi lagað til í gildistíðarskeiðnum.

## Nýggj dátuverndarlóg

Føroyar vórðu í 2010 av ES-nevndini mettar at vera eitt sokallað trygt triðjaland í mun til persónupplýsingar. Tað er umráðandi fyri Føroyar – bæði fyri privata og almenna geiran – at Føroyar framhaldandi verða góðkendar av ES-nevndini, sum eitt trygt triðjaland, so at upplýsingar frítt kunnu verða fluttar millum Føroyar og ES-lond. Fyri at tryggja, at verndarstøðið fyri skrásett er nóg gott og tíðarhóskandi, og fyri at tryggja, at Føroyar kunnu fylgja altjóðageiðini og verða góðkendar av ES-nevndini sum trygt triðjaland, hevur seinnu árini verið arbeitt við at gera eina nýggja dátuverndarlóg.

Kommunufelagið hevur, saman við øðrum aktørum, verið boðið til kunningarfundir við embætisfólk hjá landinum í sambandi við at arbeitt hevur verið við nýggju dátuverndarlógini, og hevur felagið á hendan hátt havt møguleika at ávirka nøkur viðurskifti í lógini, sum viðvíkja kommununum.

Í samráð við danska kommunufelagið, KL, hava vit tikið útgangstøði í teimum royndum, ið danskar kommunur hava gjørt sær við nýggju reglunum, ið hava verið í gildi í Danmark í nærum 2 ár nú. Í samskiftinum við landsmyndugleikarnar hevur Kommunufelagið víst á, at vit í Føroyum eiga at laga nýggju lógina til í mun tær royndir, ið eru gjørdar aðrastaðni.

Tað sæst longu í fyrireikingunum í sambandi við GDPR, at nýggju krøvini í dátuverndarlógini verða ein avbjóðing fyri alt samfelagið og tí eisini fyri kommunalu fyrisitingarnar.

Sum fyrisitingarmyndugleiki eru kommunurnar týðandi samfelagsaktørar. Hesin týdningur sæst aftur í lógaruppskotinum til nýggja dátuverndarlóg, sum er løgd fram í løgtinginum undan jólum 2019. Sambært uppskotinum fær Kommunufelagið lógarásetta umboðan í Dáturáðnum. Tað er Dátuváðið, sum í øllum ivamálum leggur fast, hvussu løgtingslógin skal tulkast, og hvussu siðvenja á ávísum økjum skal verða. Harumframt skulu øll meginreglulig mál. og mál av stórum týdningi. í útgangsstøðinum leggjast fyri Dátuváðið.



*Oman móti Skopun*

## Endurskoða bókasavnsøkið

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur sett ein arbeiðsbólk at skriva álit við tilmæli um at dagføra bókasavnslógina.

Arbeiðssetningurin er at lýsa tey øki í bókasavnslógini, har neyðugt er at broyta í mun til verandi lóggávu og at koma við uppskotum um broytingar, serliga við atliti at:

1. Ásetingum um universitetsbókasavn
2. Heimildini at áseta minstamark í mun til at gjalda út bókasavnsgjald
3. Dagføra stuðulsskipanina til fólkabókasøvn, bæði viðv. rakstri og stuðli til bygging
4. Høvuðsbókasavnsuppgávuni
5. Talgildum tilfari

Ætlanin var at handa landsstýrismanninum álit við tilmæli í seinasta lagi 1. mai 2020. Men orsakað av Covid 19 støðuni er arbeiðið nógv seinkað.

## Avtala um undirvísingartilfar

Kommunufelagið og Nám eru í løtuni við at leggja seinastu hond á arbeiðið at gera avtala um undirvísingartilfar og undirvísingarportalin Snar og aðrar talgildar loysnir.

Sambært avtaluni skal Nám lata fólkaskúlanum allar pappírsbøkur og talgildar bøkur, umframt tryggja at øll talgild amboð, ið Nám umsitur til skúlabrúks, eru tøk hjá fólkaskúlunum at nýta í arbeiðshøpi og undirvísing.

Talan er um:

- Talgildar bøkur
- Talgild próvtøkuskipan (Wiseflow) hald og tænasta í samband hesa skipan
- Samskiftisskipan (Microsoft office 365) umframt tænastu
- Skemaleggingarskipanina (Gp Untis)
- Umsitingarskipan - Kervið og FSG
- Undirvísingarportalurin Snar
- Tilfarsgrunnur (mitCFU).

Ætlanin er, at Kommunufelagið og Nám gera uppskot til sáttmála, sum kommunurnar síðani sjálvboðið kunna skriva undur.

## Skipa ferðavinnu

Støðan í ferðavinnuni er kreppukend, og vænta vit lítla ella onga innkomandi ferðavinnu í ár. Hetta er ein dygg-ur smeitur fyri aktørar í vinnuni, men kann eisini geva myndugleikunum, sum varða av, høvi at arbeiða meira miðvíst við øðrum átøkum, sum kunnu skipa ferðavinnuna betur, til tá alt væntandi fer at virka aftur sum vanligt.

Uppgávubýtið millum land og kommunur er enn ógreitt. Ábyrgdar- og leiklutabýtið millum Visit Faroe Islands (VFI) og kommunurnar er ógreitt, og skipanin við kunningarstovum tilvildarlig. Ógreitt er eisini, hvønn leiklut kunningarstovurnar frameftir skulu hava, hvussu tær skulu fíggjast, og hvørji kommunalu samstørvini eru á hesum øki. Stuðulsskipanin hjá VFI eigur eisini at verða eftirmett, og kommunurnar eiga at hava ein størri leiklut, tá raðfest verður, hvussu stuðulin verður latin.



# 4. Felagið innanhýsis

1. januar 2014 vórðu Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag løgd saman í eitt Kommunufelag. Kommunufelagið hevur sostatt 6 ár á baki.

Við samanleggingini varð virksemið hjá Barnaverndarstovu Føroya og Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum skipað undir fyrisitingarligu leiðslu kommunufelagsins, hóast talan framvegis er um sjálvstøðugar virkiseindir.

Í ár er avgerð tikin um, at SSP samstarvið, sum higartil hevur verið partur av Barnaverndarstovuni, skal skipast sum sjálvstøðug eind undir eini samstarvsnevnd, men við framhaldandi heimstaði í Kommunuhúsinum.

Her skal stutt greiðast frá virkseminum á hesum økjum.

## Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF)

Fyrisitingin í KAF ger á hvørjum ári eina yvirskipaða ætlan fyri arbeiðið inniverandi ár. Í arbeiðsætlanini fyri 2019 vórðu komandi sáttmálasamráðingarnar raðfestar høgt. Stórur dentur varð lagdur á at verða væl fyrireikað, eitt nú at hava góða fatan av búskaparligu støðuni, soleiðis at lønargongdin samsvarar gongdini í samfelagnum og búskaparligum tilráðingum.

KAF heitti á búskaparfrøðing um at gera eina meting av búskaparligu støðuni, og av øðrum viðurskiftum, ið hava ávirkan á lønargongdina í føroyska samfelagnum, serstakliga á kommunala og almenna økinum. Frágreiðingin skal brúkast í arbeiðinum við lønarlagnum í sambandi við samráðingarumfarið 2019 – 2021/2022.

Umframt at ráðgeva og vegleiða um sáttmálaviðurskiftini og lønar- og setanarviðurskiftini hjá starvsfólkunum í kommununum, hjá SEV og IRF, skipar KAF regluliga fyri sáttmáladøgum. Felagið raðfestir samskifti við kommunalu arbeiðsgevararnar og fakfeløgini høgt, og dentur hevur seinastu tíðina verið lagdur á at skipa netverk innan dagstovnaøkið og starvsfólkaøkið, har høvi er at viðgera mál av felags áhuga.

Kommunufelagið, herundir KAF og Barnaverndarstovan, er í eini tilgongd at tryggja, at feløgini liva upp til reglurnar í lógini um persónupplýsingar. Tilgongdin at tryggja, at mannagongdirnar í felagnum liva upp til lógarásettu krøvini, verður gjørd saman við uttanhýsis ráðgevarafyritøku. Fyrstu fetini eru tikin við at eyðmerkja tær skipanir, ið felagið brúkar. Næsta stigið er at tryggja, at allar mannagongdir í felagnum, herundir teldupostasamskifti, journalisering o.a. liva upp til krøvini í lógini.

Samráðingarnar á kommunala sáttmálaøkinum byrjaðu nakað eftir summarfrítíðina 2019. Fyrst var fundur við Fíggjarmálaráðið um útgangsstøðið fyri samráðingunum. Partarnir samdust um at geva lønarhækkan í krónum, eins og í undanfarnu samráðingunum.

Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið løgdu tó støðið fyri samráðingarumfarið í mars 2020 við eini samansettari lønarhækkan í krónum og prosentum.

Samráðingarnar millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið vóru komnar væl áleiðis í mars 2020, men støðgaðu upp, tá KAF fór í seming saman við Heilsuhjálparafelagnum. Dagarnir undan, at semingsuppskot varð lagt fyri partarnar fríggjadagin 13. mars 2020, vóru truplir, tí umboðini fyri partarnar vórðu órógvað av íkomnu korona-støðuni og tilmælunum frá landsstýrinum um ikki at møtast óneyðugt fyri at minka um smittuspjaðingina av Covid 19.

Seinastu fundirnir við Heilsuhjálparafelagið og Semingsstovnin vórðu tí avgreiddir um telefon og Skype. Tíbetur bar á mál, og báðir partar tóku undir við semingsuppskotinum leygardagin 14. mars 2020.

Undan korona-tíðarskeiðinum, í endanum av februar mánað 2020, varð KAF í samráðingum við Starvsmannafelagið, handverkarafeløgini, Maskinmeistarafelagið og Heilsuhjálparafelagið.

Fleiri onnur fakfeløg ynsktu at koma í gongd við samráðingarnar, men hesi fingu boð um at bíða, til samráðingarnar við Starvsmannafelagið og Heilsuhjálparafelagið vóru lidnar.

Sum greitt er frá omanfyri, varð semja gjørd við Heilsuhjálparafelagið 14. mars 2020, meðan samráðingarnar við hini fakfeløgini vóru útsettar í fyrstu atløgu til 31. mars 2020. Síðani hava vit ásannað, at korona-tíðarskeiðið gjørdist nógv meira umfatandi og drúgvari, enn vit á nakran hátt kundu ímyndað okkum.

Nú vit eru komin út í mai mánað 2020, er samskiftið tikið upp aftur við bæði arbeiðsgevararnar og fakfeløgini.

## Barnaverndarstova Føroya

Aðaluppgávurnar hjá Barnaverndarstovuni eru m.a. at veita barnaverndartænastunum kring landið holla vegleiðing og ráðgeving. Seinastu árini hava vit sæð ein øktan eftirspurning eftir løgfrøðiligari ráðgeving í handfaringini av barnaverndarmálum. Krøvini til málsviðgerðina á barnaverndarøkinum eru økt orsakað av, at tilvitanin hjá foreldrum og børnum um kærumøguleikar og innlit er vorðin størri. Barnaverndarstovan hevur tí valt at seta ein løgfrøðing við drúgvum royndum innan barnavernd, Annu Dam, í starv, sum hevur til uppgávu at styrkja løgfrøðiligu førleikarnar innan barnavernd. Hetta merkir, at tær átta barnaverndartænasturnar fáa ta ráðgeving og tann stuðul tær hava fyri neyðini í málum, sum eru trupul at handfara.

Eisini er uppgávan at virka sum ráðgevi hjá landsstýrismanninum á barnaverndarøkinum, at styrkja og samskipa barnaverndarøkið, og at fáa til vega hagtøl og at skipa fyri gransking og menning á økinum.

Hagtølini um virksemið hjá barnaverndartænastunum kring landið eru at finna á heimasíðuni hjá Barnaverndarstovuni. Niðanfyri sæst yvirlit yvir tal av barnaverndarmálum seinastu 10 árini. Yvir alt tíðarskeiðið sæst ein lítil vøkstur, men verður hædd tikin fyri fólkavøkstrinum sama tíðarskeið er talið av málum støðugt. Talva 1 á næstu síðu.

Fosturforeldraskipanin er ein týðandi partur av virkseminum hjá Barnaverndarstovuni. Tá avgerð er tikin um, at eitt barn skal verða sett heiman, royna barnaverndartænasturnar fyrst at finna fosturfamiljur í familjuni ella í netverkinum hjá barninum. Um hetta ikki letur seg gera, er neyðugt at finna fosturfamilju uttanfyri familjuna og netverkinum hjá barninum.

Ein av uppgávunum hjá Barnaverndarstovuni er at gera og røkja eina skrá yvir fosturforeldur, sum eru tøk at taka ímóti einum barni, tá barnaverndartænasturnar ynskja eitt fosturheim. Tað vísir seg at vera torført at finna familjur, sum ynskja at gerast fosturforeldur, serliga í høvuðsstaðarøkinum.

Ein av uppgávunum hjá Fosturforeldraskipanini er tískil at styrkja um tað uppsøkjandi arbeiðið og økja um tilvitanina hjá almenninginum um møguleikan at gerast fosturforeldur. Samstundis eisini at førleikamenna fosturforeldur, sum eru í skipanini.

Barnahúsið var sett á stovn í desember 2013 og gjørdist tá partur av virkseminum hjá Barnaverndarstovuni. Hugsjónin við Barnahúsinum er hin sama sum við barnahúsum í hinum Norðurlondunum, har atlitið til barnið er fremst. Barnahúsið verður nýtt í málum um ágang móti børnum, tá tørvur er á tvørfakligum samstarvi millum barnaverndartænastu, løgreglu og/ella heilsuverk. Arbeiðið hjá Barnahúsinum snýr seg um at hjálpa avvarðandi barnaverndartænastu at fáa greiðu á viðurskiftunum hjá einstaka barninum. Hetta fyri at finna fram til, í hvønn mun barnið hevur tørv á serkønari hjálp. Avvarðandi myndugleikar møta barninum í Barnahúsinum, og partarnir gera í mest møguligan mun sítt arbeiði inni í Barnahúsinum. Tíðin hevur greitt víst, at tørvur er á einum staði, har tvørfakligt arbeiði við børnum og avvarðandi í málum um harðskap og kynsligan ágang fer fram. Síðani Barnahúsið var sett á stovn, hevur talið á málum, sum eru viðgjørd í Barnahúsinum, kunna verið samanborið við tøl, sum vit síggja í Barnahúsum í Danmark.

## SSP samstarvið 10 ár

Í fjør bar til at hátíðarhalda 10 ára stovningardagin hjá SSP. Henda tvørfakliga samstarvskipanin, ið hevur sín uppruna í Danmark, kann sigast at hava fingið fast undir føtur og er virkin á flest øllum skúlum í landinum.

Arbeiðið við fyribyrging hevur lagað seg og er broytt síðani, SSP samstarvið varð sett á stovn fyri tíggju árum síðani. Doyður er lagdur á ein uppbyggjandi hugburð, har foreldrini eru ein tann mest týdningarmikli samstarvsfelagin fyri at røkka børnum og ungum.

Eitt tað størsta frambrotið var semjan 22. desember 2017, at samstarvið skuldi fevna um børn og ung 0–18 ár. Hettar tryggjar, at vit kunnu arbeiða miðvíst frá heilt ungum árum, har vit vita, at arbeiðið hevur størstu ávirkan. Her hava kommunurnar eina serliga støðu og ábyrgd, tí gransking vísir, at starvsfólk, ið arbeiða í fremstu røð, á millum annað dagstovnum, hava størst ávirkan á, at børn trívast og mennast og kunnu gera sítt til, at børn ikki detta niður í millum.

Fyri ikki at sleppa hesum møguleika av hondum, verður miðvíst arbeitt við arbeiðsgongdum, ið muna, og sum venda sær til dagstovnar og dagrøkt: „Hvussu tryggja við okkum, at børn og ung í Føroyum koma væl undan". Royndirnar eru, at nógv starvsfólk á økinum vilja vera við í tilgongdini.

Eitt týðandi mál hjá SSP ráðgevingini er at fáa í lag eina yvirskipaða lýsing og ætlan á barna- og ungdómsøkinum. Sum nú er, er eingin sjálvsøgd samanrenning millum geirar, og arbeiðið er sera sundurbýtt. Hettar er ein fortan fyri, hvussu vit við skili brúka tvørfakliga og fíggarliga tilfeingið best.

Leingi hevur ynski verið um at dagføra sáttmálan, so hann er í tráð við verandi praksis og tørv. Hettar arbeiði er gjørt av pørtunum í samstarvinum, ið eru MMR – AMR – KF – Politiið. Tann týðandi broytingin er, at SSP ráðgevingin verður ein sjálvstøðug eind, ið heldur til hjá Kommunufelagnum.

Yvirlit yvir tal av barnaverndarmálunum 2009–2018

Talva 1








# 5. Átøk í sambandi við Covid 19

12. mars gav landsstýrið kommunum boð um, at dagstovnarnir skuldu steingja frá mánadegnum 16. mars. Samstundis varð boðað frá, at kommunurnar áttu at skipa neyðansing fyri tey børn, ið hava foreldur, sum noyðast at arbeiða. Hetta kann vera tí bæði foreldur arbeiða innan heilsu, umsorgan ella tilbúgving, ella eru í privatari framleiðslu ella tænastuvinnu, og sum ikki hava møguleika fyri at vera heima við sínum børnum. Ávís ósemja var í byrjanini um tulkingina av omanfyrinevndu skilmarking av, hvør hevur rætt til ansing sambært hesi neyðskipan.

Í miðal vóru uml. 2,5 % av børnunum á dagstovnunum fyrstu tíðina.

Ávís orrusta er staðin av, at kommunurnar hvør í sínum lagi hava boðað frá, at foreldur sleppa undan at gjalda dagstovnagjald fyri apríl mánað, heldur enn at finna ein felags leist fyri hesum umvegis Kommunufelagið. Tá samanum kemur hava rættiliga nógvar kommunur valt at sleppa foreldrum undan at gjalda.

20. apríl var farið undir at lata dagstovnaøkið stigvíst uppaftur, og 1. mai høvdu flestu dagstovnar aftur fult virksemi.

Starvsfólk á dagstovnaøkinum hava stórt rós uppiborið fyri tað megnar arbeiði, tey hava gjørt undir serliga truplum umstøðum.

Á fundinum 12. mars boðaði løgmaður eisini frá, at avmarkingar vórðu settar fyri vitjanum á eldrabústovnum hjá kommununum, og frá 13. mars vóru nærum allir eldrabústaðir stongdir fyri vitjanum.

Kommunurnar høvdu longu frammanundan avlýst at kalla øll tiltøk, har nógv eldri fólk vóru savnað.

Kommunufelagið hevur samskipað eina heilsufakliga ráðgeving. Hendan er partvíst grundað á eina avtalu við Pál Weihe, yvirlækna, og partvíst við Tórshavnar kommunu um at Naina Túgvustein, fakligur dygdarmennari hjá Heilsu- og umsorganartænastuni, røkir ávísar uppgávur fyri kommunufelagið.

Leiðslur og starvsfólk á eldraøkinum hava gjørt vart við, at starvsfólk eru stúrin og undir sálarligum trýsti, m.a. fyri at verða smittað, men serliga fyri sjálv at bera smittu við sær inn á eldraøkið. Eftir áheitan frá leiðslunum á eldraøkinum, hevur Kommunufelagið tí skipað eina sálarfrøðiliga tilbúgving/ráðgeving fyri starvsfólk á eldraøkinum. Avtala er gjørd við fakfólk, sum vanliga starvast á Barnavendarøkinum, um at taka sær av hesum.

Starvsfólk okkara á eldraøkinum hava ofrað nógv fyri at halda smittuni burtur frá eldraøkinum.

Starvsfólk liva sundurskild frá húsfólki og makum, sum arbeiða uttanlands, ikki tí tær almennu leiðreglurnar áleggja teimum at gera tað, men tí tey av sínum eintingum gera hetta fyri at verja tey eldru, sum tey í sínum arbeiði hava umsorgan fyri og taka stóra ábyrgd av.

Fyri at lætta um stóru ábyrgdar og skuldarkensluna hjá hesum starvsbólki og ikki minst fyri at fyribyrgja at smitta kemur inn á eldraøkið uttan úr heimi, so hevur Kommunufelagið heitt á heilsumyndugleikarnar at bjóða starvsfólki, sum arbeiða uttanlands og sum liva saman við starvsfólki, sum starvast innan eldra- og heilsuøkið, at verið testað fyri korona.

## Samskiftisleistur við landsstýrið

Kommunufelagið hevur gjørt uppskot um fastar, afturvendandi fundir millum land og kommunur fyri at skapa eitt meira skipað samskifti og sínámillum kunning, bæði um ætlanir og áleikandi mál

Ár undan ári er tilgongdin í samskiftinum millum land og kommunur hin sama: Skilagott samskifti er um ávís, ítøkilig evni, men kommunurnar kæra seg støðugt um, at tiltøk – ikki minst lógarbroytingar – sum landsstýrið fremur, eru ov illa fyrireikað, ikki eru samskipað tvørturum málsøki, verða framd uttan atlit til, hvørjar fylgjurnar fyri kommunurnar eru, og sum oftast eisini koma í ljósmála so seint, at kommunurnar ikki fáa lagt upp fyri broytingunum, tá tær gera fíggjarætlanirnar.

Afturvendandi atfinningarnar frá landsstýrinum í mun til kommunurnar eru hinvegin, at kommunurnar leggja ætlanir og fremja tiltøk hvør í sínum lagi, soleiðis at kommunupolitiskar tiltøk fáa landspolitiskar fylgjur, sum eingin hevði ætlað, og sum samanlagt hvørki eru til gagns fyri land ella kommunur.

Viðhvørt er bæði rætt og neyðugt at bera skjótt at í politikki, og eitt av allar týdningarmestu virðunum í einum demokratiskum samfelag er, at vit bæði tora og tola, at ymisk grundsjónarmið og mótstríðandi áhugamál viðhvørt elva til politiskar ósemjur, sum ikki kunnu verða loystar, og sum tí kosta samfelagnum eitt nú fíggjarligan miss. Men tá vit ár undan ári – og uttan mun til hvørjir politiskir flokkar ella persónar manna og mynda landsstýri, kommunur og kommunufelag – ferð eftir ferð enda í hesum somu trupulleikunum, mugu vit ásanna, at talan er um bygnaðarligar trupulleikar. – Trupulleikar, ið kosta bæði landi og kommunum orku, samstundis sum úrslitini av politisku tiltøkunum verða munandi verri, enn tey kundu verið, soleiðis at tænasturnar til borgaran verða munandi verri enn tær kundu. Samstundis er vandi fyri, at áhaldandi, støðugt afturvendandi stríðsmálini gera, at fólk verða leidd og kedd av politikki.

Í vónini um, at hetta kann verða fyrsta stigið til eitt nýtt tíðarskeið í samvirkinum millum land og kommunur, skjýtur kommunufelagið tí við hesum uppskoti upp ein leist fyri samskifti, samskipan og samstarvi millum land og kommunur, har bulurin er ein fundarskipan við føstum samskiftisfundum eftir avtalaðum leisti á bæði politiskum og embætisligum stigi.

Í sambandi við Covid 19 hevur gjøgnumgangandi gott samskifti verið millum land og kommunur, men givið er, at tað eru nógv viðurskifti í tilbúgvingini, sum skulu endurskoðast eftir Covid 19.

# 6. At enda:

Ein grundleggjandi táttur í okkara sjálvsfatan og fatan av føroyska samfelagnum er, at vit liva í einum fólkaræðisligum vælferðarsamfelag. Sambindingin av hesum báðum orðunum – fólkaræði og vælferðarsamfelag – sigur okkum, hvørji grundleggjandi virði vit byggja samfelag okkara á. At útgangsstøðið er fólkaræði og at eins atgongd til politisk rættindi er treytað av eins atgongd til útbúgving og sosial rættindi.

Kommunurnar eru frumeindin í fólkaræðinum, kommunurnar eru eisini høvuðsaktørurin í vælferðarsamfelagnum. Tí liggur ein stór ábyrgd á øllum kommunupolitikarum at tryggja, at eisini framtíðar ættarlið í Føroyum sleppa at liva og virka í einum fólkaræðisligum vælferðarsamfelagi, har atgongdin til vælferðartænastur framhaldandi er ein almennur rættur, eisini – ella serliga – tá tíðirnar eru truplar, tá vit ikki altíð kenna fullu avleiðingarnar av øllum okkara avgerðum, og avbjóðingarnar at stýra tí eru stórar.

Lítil ivi er um, at komandi tíðirnar kunna koma at verða avbjóðandi fyri allan heimin, og fyri okkum føroyingar.

Í tíðum sum hesum vit hava upplivað seinastu mánaðirnir, er neyðugt, at land og kommunur samstarva neyvt um tær avbjóðingar, sum eru. Í veruligari virðing hvør fyri øðrum finna felags stev um stórar avgerðir og fyriskipanir, ið tørvur er á, og sum eru neyðugar fyri, at komandi ættarlið eisini skula kunna liva í einum framkomnum vælferðarsamfelagi. Endamálið hjá okkum øllum, bæði landspolitikarum og kommunupolitikarum, má vera at hava eitt samfelag, ið mennist í javnvág. Har ábyrgdarbýtið er greitt, har borgarar í øllum landinum hava rætt til grundleggjandi vælferðartænastur, og har borgararnir hava veruligar møguleikar fyri at ávirka, hvussu vælferðartænasturnar kring landið á bestan hátt kunnu verða lagaðar til tørvin í nærsamfelagnum.

Eg fari at enda við at takka tykkum øllum fyri gott samstarv hesi 4 árini, mær hava verið givin at vera formaður í Kommunufelagnum. Takk fyri álitið mær er sýnt, takk fyri mangan góðan fund og gevandi politiskar viðgerðir, sum onkuntíð hava verið krevjandi, men tó sum allar oftast hava ført til góðar semjur um mangan trupul mál.

Eisini skal eg takka starvsfólkunum í Kommunufelagnum fyri, at tey altíð eru klár at veita okkum professionell ráð og vegleiðing, og at skipa so fyri, at vit fáa mál lýst, so vit føra fyri at taka góðar avgerðir – bæði í felagsskapi, og hvør sær úti í okkara kommunum.

Tó at vit eru ymisk, so stíla vit øll móti sama máli – at skapa borgarum okkara so góðar umstøður sum gjørligt, og við tí leggja afturat grundarlagnum undir fólkaræðisliga vælferðarsamfelagnum Føroyar.



*Ráðstevna á Hotel Føroyum fyriskipað av Kommunufelagnum*

# Um Kommunufelagið

**Stýrið 2020**
**Stýri felagsins er mannað við borgarstjórum samsvarandi §7 í viðtøkunum:**
Dennis Holm, formaður, Vágs kommuna
Heðin Zachariasen, næstformaður, Sunda kommuna
Annika Olsen, Tórshavnar kommuna
Aimé Jacobsen, Sørvágs kommuna
Poul Clementsen, Sands kommuna
Eyðdis Hartmann Niclasen, Vága kommuna
Jógvan Skorheim, Klaksvíkar kommuna
Jógvan í Skorini, Eiðis kommuna
Jóhan Christiansen, Eysturkommuna
Kristin Michelsen, Tvøroyrar kommuna
Pauli T. Petersen, Vestmanna kommuna
Sonni á Horni, Fuglafjarðar kommuna
Torbjørn Jacobsen, Runavíkar kommuna

**Starvsfólkabólkurin 2020**
**Í starvsbólkinum eru umsitingarleiðararnir sambært §8 í viðtøkunum:**
Formaður: Jákup Frants Larsen, Fuglafjarðar kommuna
Bjørgfríð Ludvig, Tórshavnar kommuna
Dinna Jensen, Runavíkar kommuna
Erik Lervig, Eysturkommuna
Eyðun Kjølbro, Sunda kommuna
Guðrun Ejdesgaard, Eiðis kommuna
Jóannes N. Dalsgaard, Vága kommuna
Jónleyg Bech, Tvøroyrar kommuna
Marner Højsted, Sands kommuna
Maud Poulsen, Vestmanna kommuna
Petry Joensen, Vágs kommuna
Sunrid Rasmussen, Sørvágs kommuna

**Starvsfólk KF Teldupostur: Telefon:**
Eyðun Christiansen, stjóri eydunc@kf.fo 28 24 80
Jóhan Lamhauge, løgfrøðiligur ráðgevi johanlam@kf.fo 52 19 75
Hans Kári Vang, búskaparfrøðingur hanskariv@kf.fo 78 70 05
Armgarð Hammer, skrivari armgard@kf.fo 28 24 81
Sigrid J. Dalsgaard, verkætlanarleiðari sigridjd@kf.fo 27 01 15
Martin Johannessen, skrivstovufólk martin@kf.fo

**Starvsfólk KAF Teldupostur: Telefon:**
Anita Fugløj, leiðari anita@kaf.fo 22 63 39
Jónleyg J. Bech, fulltrúi jonleyg@kaf.fo 28 03 39
Bina Reginsdóttir, fulltrúi binar@kaf.fo 22 98 66

**Starvsfólk BVS Teldupostur: Telefon:**
Oddbjørg Balle, leiðari ob@bvs.fo 22 56 96
Anna Dam, løgfrøðiligur rágevi annadam@bvs.fo 51 90 82
Jendis Gærdbo, sosialráðgevi jl@bvs.fo 22 30 23
Óli Rubeksen, SSP ráðgevi or@bvs.fo 22 24 98

**Nevndin í KAF**
Annika Olsen, forkvinna, Tórshavnar kommuna
Bogi Bendtsen, SEV
Eyðdis Hartman Niclasen,Vága kommuna
Jógvan í Skorini, Eiðis Kommuna
Pauli Trónd Petersen, Vestmanna Kommuna
Poul Andreas Joensen , IRF

**Skrivstovan**
Kommunufelagið
R. C. Effersøesgøta 26
100 Tórshavn
Telefon 30 24 80
www.kf.fo
kf@kf.fo

**Uppskot til lógir og kunngerðir v.m., ið hava verið til hoyringar hjá KF 2019/2020:**

| Innkomið | Uppskot | Uppskot-stillari |
|---|---|---|
| 27/3-19 | Broyting í elveitingarlógini | Andstøðan |
| 9/4-19 | Loðslógin - ábyrgd fyri útvegan av loðsing | Andstøðan |
| 12/4-19 | Vatnskutarakunngerðin | UVMR |
| 12/4-19 | Politilógin | LMS |
| 12/4-19 | Vápnalógin | LMS |
| 12/4-19 | Lóg um PET | LMS |
| 12/4-19 | Vápnakunngerð | LMS |
| 1/5-19 | Kunngerð um sigling við førum, ið taka upp til 12 ferðafólk | UVMR |
| 1/5-19 | Kunngerðir um viðurskifti í Musikkskúlanum | MMR |
| 8/5-19 | Veðurlagspolitikkur | HIMR |
| 24/5-19 | Kunngerð um førleikastovur í fólkaskúlanum | MMR |
| 24/5-19 | Kunngerð um skipan av serflokkum | MMR |
| 24/5-19 | Kunngerðir um heilsu og námsfrøðiligu hjálparaútbúgvingina | MMR |
| 29/5-19 | Kunngerð um loðsing, gjøld v.m | UVMR |
| 29/5-19 | Kunngerð um flutning av vandamiklum farmi á landi o.a. | SMR |
| 11/7-19 | Kunngerð atgongd frá bjargingartænastum til akfarsskránna hjá Akstovuni | SMR |
| 26/8-19 | Rættargangslógin | LMS |
| 8/10-19 | Lóg um almannapensjónir – at flyta pensjónir millum lond | AMR |
| 8/10-19 | Kunngerð um lærlingar – broyting í skattareglum | FMR |
| 9/10-19 | Dátuverndarlógin | LMS |
| 19/11-19 | Royndarverkætlan fyri kommunala samstarvsøkið í Suðuroynni | AMR |
| 26/11-19 | Lóg um almannapensjónir o.a. (Lækking av mótrokning) | AMR |
| 26/11-19 | Lóg um áseting og javning av almannaveitingum | AMR |
| 26/11-19 | Vælferðarpakkin | Andstøðan |
| 4/12-19 | Dagstovnalógin (Minstamark av starvsfólkatímum á dagstovnum) | Andstøðan |
| 20/12-19 | Revsilógin | LMS |
| 23/12-19 | Vælferðarpakkin | AMR |
| 9/1-20 | Víðka kærunevndina í lendismálum til umhvørvisvernd, elveiting og havumhvørvi | UVMR |
| 10/1-20 | Lóg um frískúlar | UMMR |
| 13/1-20 | Kunngerð um taðing | UVMR |
| 27/1-20 | Løgtingslóg um eftirløn | FMR |
| 22/1-20 | Broyting í eftirlønarlógini og rentutryggingarlógini v.m. | FMR |
| 29/1-20 | Lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet | HMR |
| 29/1-20 | Broyting í Vápnalógini | LMS |
| 5/2-20 | Náttúrumargfeldislógin | Andstøðan |
| 20/2-20 | Uppskot til samtyktar um at fáa útbúgvið fleiri røktarstarvsfólk | Andstøðan |
| 12/3-20 | Kunngerð um undirvísing í føroyskum sum annaðmál | UMMR |
| 30/4-20 | Uppskot til samtyktar um at áseta, hvør myndugleiki hevur ábyrgd av heimleysum í Føroyum | Andstøðan |
| 13/5-20 | Uppskot til samtyktar um ikki at loyva mismuni á arbeiðsmarknaðinum eitt nú vegna aldur | Andstøðan |
| 13/5-20 | Uppskot til samtyktar um fjarstørv kring landið | Andstøðan |




Saksun

# Viðtøkur fyri Kommunufelagið

**Navn, limaskapur og heimstaður**
**§ 1.** Navn felagsins er Kommunufelagið, og hevur felagið heimstað í Tórshavn

**§ 2.** Allar kommunur í Føroyum kunnu gerast limir.

**§ 3.** Upptøka av nýggjum limum verður góðkend á aðalfundi.

**Endamál**
**§ 4.** Endamál felagsins er at virka fyri felags áhugamálum, størri kommunalum sjálvræði, og betri samstarvi millum kommunurnar.

**Aðalfundurin**
**§ 5.** Aðalfundurin er hægsta vald felagsins.
Stk. 2. Borgarstjórin umboðar kommunustýrið til at taka avgerð á aðalfundinum. Aðrir kommunustýrislimir hava rætt at møta.
*Stk. 3.* Boðast skal til aðalfund við í minsta lagi 30 daga freist. Fundarskrá verður kunngjørd limakommununum í seinasta lagi 14 dagar innan aðalfundin.
*Stk. 4.* Limir, ið vilja hava mál til viðgerðar á aðalfundinum, senda felagnum hesi í minsta lagi 21 dagar innan aðalfundin.
*Stk. 5.* Á aðalfundi hevur hvør kommuna eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar undan aðalfundinum, tó so, at eingin kommuna hevur fleiri enn 45 % av samlaðu atkvøðunum.
*Stk. 6.* Er ikki annað tilskilað í hesum viðtøkum, verða avgerðir á aðalfundi tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.
*Stk. 7.* Aðalfundurin er viðtøkuførur, tá ið minst helvtin av limunum eru møttir.

**§ 6.** Ársaðalfundur verður hildin á hvørjum árið í seinasta lagi 30. apríl við hesi skrá:
a) Val av fundarstjóra.
b) Formaðurin letur frágreiðing um virksemi felagsins í farna árinum og um framtíðarætlanir felagsins.
c) Framløga av roknskapi til góðkenningar.
d) Val av grannskoðara.
e) Innkomin uppskot.
f) Ymiskt.
*Stk. 2.* Eykaaðalfundur verður hildin, tá ið stýrið heldur tað vera neyðugt, ella tá ið minst helmingurin av limakommununum skrivliga biðja um tað. Innkalling til eykaaðalfund fer fram á sama hátt og við somu freist, sum til vanligan aðalfund.

**Stýrið**
**§ 7.** Tá talan ikki er um mál, sum skulu viðgerast á aðalfundi, er ovasta leiðsla felagsins eitt stýri við 13 limum, sum er sett saman fyri 4 ár í senn. Stýrislimur skal vera borgarstjóri.
*Stk. 2.* Stýrið tekur við 1. januar eftir kommunustýrisval, og verður stýrið valt eftir hesi skipan:
- Norðuroyggjar (Klaksvík, Hvannasund, Viðareiði, Húsa k., Kunoy og Fugloy) 1 lim.
- Eystur Eysturoy (Fuglafjørður, Eystur k.) 2 limir.
- Vestur Eysturoy (Nes, Runavík, Sjóvar k.) 1 lim.
- Sundalagið (Sunda k. og Eiði) 1 lim.
- Streymoy (Tórshavn) 1 lim.
- Vesturstreymoy (Vestmanna og Kvívík) 1 lim.
- Vágar (Sørvágur, Vága k.) 1 lim.
- Sandoy (Sandur, Skopun, Skálavík, Húsavíkar k. og Skúvoy) 1 lim.
- Norður Suðuroy (Hvalba, Tvøroyri og Fámjin) 1 lim.
- Suður Suðuroy (Hov, Porkeri, Vágur og Sumba) 1lim.

Kommunustýrini í hvørjum einstøkum øki gera semju um at velja ein stýrislim. Semjast kommunurnar ikki um umboðanina, verður borgarstjórin í størstu kommununi umboð fyri økið.
*Stk. 3.* Kommunurnar sum sambært stk. 2 ikki fáa lim í stýrið, velja 2 umboð eftir hesum leisti.
- Kommunurnar við fleiri enn 750 íbúgvum velja sínámillum eitt umboð
- Kommunurnar við færri enn 750 íbúgvum velja sínámillum eitt umboð

*Stk. 4.* Tá ið valt verður sambært stk. 3, hevur hvør kommuna eina atkvøðu. Atkvøðugreiðslan fer fram eftir meirilutavalháttinum sambært § 2 í kommunustýrislógini.
*Stk. 5.* Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni eftir somu mannagongd, sum formaður og næstformaður verða valdir í kommunustýrum, tó so, at formaður og næstformaður verða valdir fyri 2 ár í senn.
*Stk. 6.* Stýrisfundur er viðtøkuførur, tá ið minsta lagi helmingurin av stýrislimunum eru møttir. Hvør stýrislimir hevur eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar í teimum kommununum, sum stýrislimurin umboðar. Tó so, eingin stýrislimir kann hava fleiri enn 45 % av samlaðu atkvøðunum.
*Stk.7.* Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Miðast skal tó ímóti, at stýrisavgerðir eru einmæltar.
*Stk. 8.* Stýrisfundur skal vera í minsta lagi eina ferð hvønn ársfjórðing. Formaðurin kann kalla stýrið til fundar, tá mál er, sum krevur stýrisavgerð, og sum ikki kann bíða til næsta regluliga fund. Stýrið kann eisini verða kallað saman, tá ið minst helmingurin av stýrislimunum skrivliga biðja um tað
*Stk. 9.* Fráboðan um stýrisfund verður send stýrislimum 14 dagar áðrenn fund.

**Starvsbólkurin**
**§ 8.** Í starvsbólkinum sita kommunuskrivararnir/-stjórarnir í teimum kommunum, sum hava umboð í stýrinum. Stýrið velur starvsbólkaformann fyri tvey ár í senn.
*Stk. 2.* Starvsbólkurin skal fyrireika mál, sum skulu viðgerast á stýris- og aðalfundi, og hann skal arbeiða við øllum málum, sum stýrið beinir til hansara.
*Stk. 3* Starvsbólkurin hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin.
*Stk. 4.* Tó skal formaðurin kalla til fundar, hvørja ferð stýrisfundur er lýstur, um so er, at mál, sum skulu viðgerast har, ikki eru liðug fyrireikað.
*Stk. 5* Allir starvsbólkalimir skulu møta á stýrisfundum.
*Stk. 6.* Stýrisformaðurin skal hava fundarboð til hvønn starvsbólkafund.

**Skrivstovan**
**§ 9.** Stýrið setur og loysir úr starvi stjóra, ið hevur ábyrgdina mótvegis stýrinum, fyri at virksemi felagsins verður rikið sambært galdandi reglum.
*Stk. 2.* Stjórin hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi, og skal í samstarvi við starvsbólkin og stýrið umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.
*Stk. 3.* Stýrið ger starvsskipan fyri stjóran.
*Stk. 4.* Stjórin setur og loysir úr starvi onnur starvsfólk eftir ásetingum í starvsskipanini sambært stk. 3.
*Stk. 5.* Starvsbólkurin er dagliga bindiliðið millum stjóran og limakommunurnar.

**Fíggjarviðurskifti**
**§ 10.** Útreiðslurnar av at reka felagið verða goldnar av limakommununum. Limagjaldið verður ásett samsvarandi íbúgvaratalinum í kommununum 1. januar í tí ári, sum fíggjarætlanin verður samtykt. Tó kann eingin kommuna rinda meira enn 45 % av limagjaldinum.
*Stk. 2.* Stýrisformaðurin ger saman við starvsbólkaformanninum og stjóranum uppskot til fíggjarætlan fyri felagið komandi fíggjarár, sum hann fyrileggur stýrinum til góðkenningar í seinasta lagi í apríl ársfjórðingi.
*Stk. 3.* Áðrenn fíggjarætlan felagsins verður viðgjørd í stýrinum, skal starvsbólkurin hava gjørt sítt tilmæli.
*Stk. 4.* Limakommunurnar rinda í minsta lagi 1/12 part av limagjaldinum hvønn mánað til felagið.
*Stk. 5.* Eingin limakommuna heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hennara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.
*Stk. 6.* Ongar avgerðir í málum, sum krevja kommunustýrissamtykt, eru bindandi fyri limakommunurnar, uttan tílík samtykt fyriliggur.

**Roknskapur**
**§ 11.** Stjórin hevur ábyrgd av roknskaparførsluni.
*Stk. 2.* Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum ella skrásettum grannskoðara.

**Aðrar ásetingar**
**§ 12.** Felagið verður teknað av stýrisformanninum og starvsbólkaformanninum ella stjóranum í felag, ella av tveimum stýrislimum saman við starvsbólkaformanninum ella stjóranum.

**§ 13.** Samtyktir um broytingar av viðtøkunum ella avtøku av felagnum skulu gerast av aðalfundinum. Í minsta lagið ¾ av atkvøðutalinum skulu vera umboðað, og uppskotið skal samtykkjast við 3/5 av greiddum atkvøðum.
*Stk. 2.* Er fundurin ikki viðtøkuførur, verður nýggjur fundur 14 dagar seinni, og er hesin viðtøkuførur uttan mun til, hvussu nógvar atkvøður eru umboðaðar. Samtykt skal tó vera við 3/5 av greiddum atkvøðum.

*§ 14.* Við minst 6 mánaða ávaring kann ein kommuna siga upp limaskap sín í felagnum til ein 1. januar.
*Stk. 2.* Kommunur, ið melda seg úr felagnum, hava einki krav móti felagnum ella ognum felagsins, og hefta ikki fyri skyldur felagsins.

**§ 15.** Verður felagið tikið av, falla ognirnar aftur til limakommunurnar í sama lutfalli, sum tær hava luttikið í útreiðslum felagsins seinasta roknskaparárið.

**Skiftisásetingar**
**§ 16.** Felagið tekur yvir øll rættindi og allar skyldur hjá KSF og FKF.

**§ 17.** Í samband við fyrsta valskeiðið, sum verður trý ár, tekur stýrið sjálvt avgerð um val av formanni og næstformanni sambært § 7, stk. 5, og viðvíkjandi val av starvsbólkaformanni sambært § 8, stk. 1.

**§ 18.** Limagjald fyri fyrsta roknskaparárið verður samtykt á stovnandi aðalfundi.

**Gildiskoma**
**§ 19.** Viðtøkur felagsins fáa gildi frá 1. januar 2014.

Samtykt á stovnandi aðalfundi 13. desember 2013

# Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**§ 1 Navn og limaskapur**
*Stk. 1.* Navn felagsins er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, stytt KAF.
*Stk. 2.* KAF er sjálvstøðugt limafelag undir Kommunufelagnum, stytt KF
*Stk. 3.* Limir í felagnum eru umframt KF, Elfelagið SEV, stytt SEV og L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, stytt IRF
*Stk. 4.* Heimstaður felagsins er Tórshavn

**§ 2 Endamál felagsins**
*Stk. 1.* Endamál felagsins er at fremja áhugamál limanna í øllum málum um lønar- og setanarviðurskifti starvsfólkanna. Hetta verður gjørt við at:

- samskipa lønarlagið og samráðast um sáttmála við starvsfólka- og fakfeløg, sum hava samráðingarrætt
- røkja áhugamál limanna í málum um lønar- og setanarviðurskifti, starvsmetingum, útbúgving o.a., og røkja samskifti við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum samráðst verður við og myndugleikar annars, við neyðugum atliti til kommustýrislógina § 5, stk. 5.
- virka fyri og ansa eftir, at galdandi sáttmálar verða hildnir
- gera sítt til, at tað slepst undan trætumálum millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ella um hetta ikki ber til, at royna at fáa tey loyst á friðarligan hátt, uttan arbeiðssteðg. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál, røkir felagið, tá heitt verður á tað, mál arbeiðsgevaranna so langt, sum hóskandi verður hildið
- virka fyri, at trætumál limanna millum verða loyst
- við skeiðvirksemi ella á annan hátt upplýsa limir felagsins um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalum/interkommunala arbeiðsgevara áhugamálum

**§ 3 Upptøka**
*Stk. 1.* KF og interkommunalir felagsskapir í Føroyum kunnu gerast limir við skrivliga at senda umsókn til nevnd felagsins.
*Stk. 2.* Limir í felagnum skriva undir viðtøkur felagsins, soleiðis sum tær eru, ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar

**§ 4 Útmeldan**
Stk. 1. Eingin kann siga seg úr felagnum, uttan við innskrivaðum brævi og við 6 mánaða freist.
Stk. 2. Hóast limur sigur seg úr felagnum, er hann framvegis bundin av galdandi sáttmálum, til hesir halda uppat.
Stk. 3. Limur, sum fer úr felagnum, hevur einki krav móti felagnum.

**§ 5 Ársfundur**
*Stk. 1.* Ársfundur verður hildin á hvørjum ári innan 1. mai.
*Stk. 2.* Nevndin í KAF hevur rætt til at luttaka á aðalfundinum hjá KF, men ikki skyldu at luttaka.
*Stk. 3.* Innkalling til ársfund verður gjørd í minsta lagi 14 dagar frammanundan.
*Stk. 4.* Saman við innkallingini verður sendur grannskoðaður roknskapur og onnur innkomin mál.
*Stk. 5.* Atkvøðurættur: KF hevur 4 atkvøður, SEV og IRF hava 1 atkvøðu hvør.
Ársfundurin er viðtøkuførur, tá meira enn helmingurin av atkvøðutalinum eru umboðað. Allar avgerðir á ársfundinum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.
*Stk. 6.* Mál, sum skulu viðgerast á ársfundinum, skulu vera KAF í hendi seinast 4 vikur undan ársfundinum. Uppskot frá øðrum enn nevndini skulu vera felagnum í hendi í so góðari tíð, at tey kunnu takast við í fundarfráboðanina, um tey skulu koma til viðgerðar á aðalfundi.
*Stk. 7.* Ársfundurin verður skipaður við hesi skrá:

a) Formaðurin skipar fyri vali av fundarstjóra
b) Formansfrágreiðing um virki felagsins í farna ári.
c) Framløga av grannskoðaðum roknskapi
d) Innkomin mál.
e) Ymiskt

**§ 6 Nevndin**
*Stk. 1.* Í nevndini sita 6 limir, sum verða valdir av nýggjum eftir hvørt kommunustýrisval og virka til nýggj nevnd er vald. KF velur 4 limir, meðan SEV og IRF velja hvør sín lim. Á sama hátt verða 6 varalimir tilnevndir.
*Stk. 2.* Nýggj nevnd tekur við so skjótt, sum allir limirnir eru tilnevndir, og í seinasta lagi 1. mai.
*Stk. 3.* Nevndin ger sína egnu starvsskipan.
*Stk. 4.* Nevndin velur sjálv formann og næstformann.
*Stk. 5.* Nevndarfundur er so ofta, sum formaðurin metir tað vera neyðugt, ella um ein nevndarlimur setir ynski fram um tað.
*Stk. 6.* Nevndin er viðtøkufør, tá meira enn helmingurin av nevndarlimunum eru á fundi.
*Stk. 7.* Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.
*Stk. 8.* Um tað, sum fer fram á nevndarfundi, verður gjørd fundarfrágreiðing, sum allir nevndarlimir góðkenna.

**§ 7 Skrivstovan**
*Stk. 1.* Fyrisitingin í KAF er partur av fyrisitingini í KF.
*Stk. 2.* Ovasta fyrisitingarliga leiðsla felagsins er stjórin í KF. Stjórin setur og loysir úr starvi starvsfólk í KAF í samráð við nevnd felagsins.
*Stk. 3.* Í øllum málum sambært § 2 virkar fyrisitingin í KAF undir leiðslu av nevnd felagsins.
*Stk. 4.* Skrivstovuleiðarin í KAF hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi og skal í samstarvi við stjóran í KF og nevnd felagsins umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.



**§ 8 Limagjald**
*Stk. 1.* Tá nýggir limir verða upptiknir, skal samráðast um limagjaldið.
*Stk. 2.* Formaðurin ger saman við stjóranum í KF og skrivstovuleiðaranum í KAF uppskot til fíggjarætlan fyri komandi ár, harundir ásetan av limagjaldi. Formaðurin leggur uppskotið fyri nevndina til góðkenningar í seinasta lagi tann 1. juli.
*Stk. 3.* KF rindar 2/3 av ásetta limagjaldinum. SEV og IRF rinda 1/3 av ásetta limagjaldinum, og av hesum rindar SEV 2/3 og IRF 1/3.
*Stk. 4.* Eingin limur heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hansara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

**§ 9 Tekning**
*Stk. 1.* Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella saman við skrivstovuleiðaranum fyri KAF.

**§ 10 Samráðingarnevnd**
*Stk. 1.* Nevndin tilnevnir umboð og formann í samráðingarnevnd. Við sáttmálasamráðingar, sum viðvíkja SEV og IRF, kann umboð frá nevndu felagsskapum luttaka sum partur av samráðingarnevndini. Annars kann samráðingarnevndin, eftir meting nevndarinnar, víðkast við umboðum fyri teir einstøku limirnar.
Samráðingarnevndin kann, um nevndin ynskir tað, leita sær sakkunnleika aðrastaðni.
*Stk. 2.* Uppgávan hjá samráðingarnevndini er at samráðast við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum hava rætt til at samráðast um øll sáttmálaviðurskifti.
*Stk. 3.* Samráðingarnevndin ger sína egnu starvsskipan.

**§ 11 Roknskapur og grannskoðan**
*Stk. 1.* Roknskapurin hjá KAF er ein sjálvstøðugur roknskapur, sum er partur av roknskapinum hjá Kommunufelagnum og verður grannskoðaður, sum ein partur av hesum.
*Stk. 2.* Inntøkur og útreiðslur fyri KAF verða neyvt atskildar frá fíggjarviðurskiftunum hjá KF annars.

**§ 12 Tagnar- og upplýsingarskylda**
*Stk. 1.* Limir felagsins hava tagnarskyldu viðvíkjandi upplýsingum um innanhýsis viðurskifti í felagnum.
*Stk. 2.* Limirnir hava skyldu til, eftir áheitan frá nevndini, at lata teir upplýsingar, ið hava týdning fyri at kunna samráðast, umframt upplýsingar um lønar-, arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti fyri starvsfólkið. Hesir upplýsingar verða viðgjørdir í trúnaði.

**§ 13 Trætumál**
*Stk. 1.* Verður arbeiðssteðgur ella trætumál millum lim í felagnum og starvsfólk tess ella fakfelagið, binda hinir limirnir í felagnum seg at stuðla og hjálpa viðkomandi limi mest møguligt við m.a. at taka lut í móttiltøkum, sum nevndin í felagnum samtykkir at seta í verk.
*Stk. 2.* Allir limir binda seg til, um nevndin boðar frá tí, ikki at seta fólk hjá teimum limum í starv, har arbeiðssteðgur er, fyrr enn hann er hildin uppat.

**§ 14 Gerðarrættur**
*Stk. 1.* Trætumál millum felagið og lim kann leggjast fyri gerðarrætt.
*Stk. 2.* Í gerðarrættinum eru tveir limir, har felagið velur annan og limurin hin, umframt ástøðumann, sum verður tilnevndur av Føroya rætti.
*Stk. 3.* Avgerðin hjá gerðarrættinum er endalig og kann ikki leggjast fyri vanligu dómstólarnar.

**§ 15 Avtøka av felagnum**
*Stk. 1.* Felagið verður tikið av, tá ið minst ¾ av limunum ynskja tað.
*Stk. 2.* Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins býttar millum limir felagsins á tann hátt, at miðaltalið fyri limagjaldið trý tey seinastu árini gevur lutfalstalið til hvønn lim.

**§ 16 Gildiskoma**
*Stk. 1.* Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar á aðalfundi í KAF.

Tórshavn hin 12. mars 2014



# Viðtøkur fyri Barnaverndarstovu Føroya

**§ 1.** Barnaverndarstova Føroya er felagskommunalur stovnur, sum kommunurnar eiga.

**Endamál stovnsins**

**§ 2.** Barnaverndarstovan skal arbeiða fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkini úti um landið og seta á stovn og reka fosturforeldraskipan sambært ásetingunum í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd við seinni broytingum.

**Politisk leiðsla**

**§ 3.** Ovasta politiska leiðsla stovnsins er stýrið í Kommunufelagnum.

**Fyrisiting**

**§ 4.** Stjórin fyri KF setir leiðara at hava dagligu fyrisitingarligu og fakligu leiðsluna av Barnaverndarstovuni.
*Stk. 2.* Stjórin fyri KF letur gera starvsskipan fyri leiðaran.
*Stk. 3.* Stjórin í KF setur og loysir úr starvi øll starvsfólk á Barnaverndarstovuni
*Stk. 4.* Leiðarin fyri Barnaverndarstovuna vísir fyrisitingarliga til stjóran fyri Kommunufelagið.

**Fígging**

**§ 5.** Kommunufelagið rindar allar útreiðslur fyri Barnaverndarstovuna
*Stk. 2.* leiðarin ger saman við stjóranum innan 1 juli eina fíggjarætlan sum verður partur av samlaðu fíggjarætlanin hjá KF.

**Grannskoðan**

**§ 6.** Roknskapurin verður grannskoðaður, sum ein partur í roknskapinum hjá KF.

**Gildiskoma**

**§ 7.** Hesar viðtøkur koma í gildi 1. januar 2014.

**Skiftisáseting**

**§ 8.** Verandi nevnd fyri Barnaverndarstovuna – formenninir í KSF og FKF, áðrenn Kommunufelagið varð stovnað – halda áfram hetta valskeiðið til 1. januar 2017, men leggja øll mál av týdningi fyri stýrið í KF.

Tórshavn 17.01.2014

# 7. Kommuna og kommunuhugtakið

Tann kommunala skipanin í Føroyum er í stóran mun ávirkað av danskari og norðurlendskari fyrisitingar- og løggávusiðvenju. Men hugtakið lokalt sjálvræði er elligamalt og byggir á hugsunarhátt úr rómverskum rætti, og snúði seg í høvuðsheitum um, at borgarar í einum býi ella øki høvdu framíhjárættindi sum borgarar í rómverska ríkinum, men vórðu stýrd av egnum lokalum myndugleikum eftir sínum egnu lógum.

Longu seint í miðøldini høvdu kommunur nógvar ymsar uppgávur at røkja og hetta broyttist nakað undir einaveldinum, men við donsku grundlógini frá 1849 bleiv sjálvstøðugi rætturin hjá kommununum til at røkja egnar uppgávur staðfestur. Tó var staturin eftirlitsmyndugleiki.

Fyrsta føroyska kommunulógin kom í 1872, og nú galdandi kommunustýrislógin er frá ár 2000.

Í Føroyum hava vit nú 29 sjálvstøðugar kommunur, sum í fólkatali eru spjaddar frá Fugloyar og Skúvoyar kommunum við færri enn 50 íbúgvum til Tórshavnar kommunu við næstan 22.000 íbúgvum. Hóast hesa spjaðing í støðd, er formliga grundarlagið undir føroysku kommunum stórt sæð eins.

## Kommunur í stýrisskipanarligum høpi

Lokalt sjálvræði er ein týðandi hornasteinur í okkara fólkaræði. Í § 82 í donsku grundlógini er ásett, at *"Kommunernes ret til under statens tilsyn selvstændigt at styre deres anliggender ordnes ved lov."*

Sambært hesum er greitt, at kommunurnar hava rætt til sjálvstøðugt at stýra egnum viðurskiftum. Kommunurnar hava sjálvstøðugt fíggjarligt frælsi og politiskt sjálvræði. Kommunurnar eru sostatt sjálvstøðugar politiskar og fyrisitingarligar eindir. Harumframt er breið semja um, at málsførleikin hjá kommunum ikki kann avmarkast á ein tílíkan hátt, at tað ikki longur er talan um veruligt sjálvræði. Umframt rættin til sjálv at útskriva og krevja upp skatt, er kommunalt sjálvræði tengt at teimum uppgávum, ið kommunurnar skulu loysa og tí politiska rásarúmi, sum kommunurnar hava til at leggja til rættis, hvussu kommunalar uppgávur skulu loysast.

§ 82 í grundlógini merkir eisini, at viðurskiftini millum landsmyndugleikarnar og kommunurnar ikki eru yvir- og undirskipað, eins og landsfyrisitingin ikki hevur heimildir at geva kommununum boð, á sama hátt sum annars er galdandi í viðurskiftunum millum landsfyrisitingina og stovnar undir landinum. Bindandi reglur fyri kommunur skulu vera ásettar við heimild í lóg ella aðrari rættarkeldu.

Umframt í grundlógini, er lokalt sjálvræði við tilverurættinum hjá kommununum staðfestur í § 56 í stýrisskipanarlógini, ið er soljóðandi: *"Rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelagsskapir kunnu skuldbindast við láni, borgan o.ø.m."*

Sambært fyrireikandi arbeiðinum, orðaljóðinum og viðmerkingunum til § 56, er ásetingin í stýrisskipanarlógini ein beinleiðis endurtøka av tí rætti, sum kommunurnar longu frammanundan hava eftir § 82 í grundlógini.

Umframt staðfestingina í grundlógini og stýrisskipanarlógini um rættin hjá kommunum at skipa egin viðurskifti, er lokala sjálvræðið eisini ein týðandi táttur í evropeisku demokratisku siðvenjuni. Sambært evropeiska sáttmálanum um lokalt sjálvræði frá 1985, verður lokalt sjálvstýri hugsað sum rætturin og førleikin hjá einum lokalum myndugleika, innan lógarinnar karmar, at stýra og fyrisita einum munandi parti av almennum viðurskiftum, við egnari ábyrgd og við støði í áhuganum hjá fólkinum á staðnum.

Almennar uppgávur skulu í høvuðsheitum røkjast av myndugleikum, sum eru borgaranum næstir. Um annar myndugleiki skal røkja uppgávuna, so eigur hetta at vera grundað á, hvat slag og av hvørjum vavi uppgávan er, og við atliti at virkisføri og fíggjarligum viðurskiftum. Tær heimildir, ið eru lagdar til lokalar myndugleikar, eiga vanliga at vera givnar til fulnar og vera óskerdar. Heimildirnar eiga heldur ikki at verða gjørdar verri ella avmarkast av øðrum almennum myndugleika, uttan so at hetta er heimilað í løggávuni.

Europæiski sáttmálin um lokal sjálvræði ásetur nakrar meginreglur, og eru hesar í høvuðsheitum,

- at almennar uppgávur skulu røkjast av einum myndugleika so tætt at borgaranum sum gjørligt,
- at teir lokalu myndugleikarnir skulu hava veruligt sjálvræði yvir teimum uppgávum, ið landafrøðiliga liggja lokalt, og
- at lokalu myndugleikarnir skulu kunna útvega sær fígging til at loysa uppgávuna, her í millum eisini rætt til at útskriva lokalan skatt.

## Kommununalrætturin

Kommunalrættur verður vanliga býttur í 3 ymsar tættir, sum er: *løggáva*, ið regulerar kommunal viðurskifti, *kommunufulltrúin* og *kommunala eftirlitið*.

Løggáva um kommunal viðurskifti snýr seg í høvuðsheitum um at skipa løggávu viðvíkjandi økjum, har kommunur hava skyldur og heimildir mótvegis borgarum sínum. Kommunufulltrúin er eitt heimildargrundarlag sum ikki er regulerað í lóg, men sum kommunurnar kunnu nýta sum heimild at virka á, um ávísar treytir eru loknar. Umframt ta løggávu, sum beinleiðis regulerar kommunal viðurskifti, eru kommunurnar eisini almennir myndugleikar, og eru tær tí eisini fevndar av fyrisitingarligari løggávu sum t.d. fyrisitingarlóg, lóg um innlit í fyrisitingina o.t.





*Við Toftavatn*

Viðurskiftini hjá føroysku kommununum verða stýrd yvirskipað eftir kommunustýrislógini frá 2000. Sambært hesi lóg er kommunustýrið evsti politiski og fyrisitingarligi myndugleiki í kommununi og hevur evsta vald og evstu ábyrgd av kommunalum viðurskiftum.

Landsstýrið hevur eftirlit við kommununum. Kommunala eftirlitið er eitt sokallað *legalitetseftirlit*, sum merkir, at landsstýrið hevur eftirlit við, at kommunurnar halda galdandi løggávu. Hinvegin skal eftirlitið ikki taka støðu til, hvørt kommunurnar bera seg skynsamt at, tí hetta hoyrir undir politiska frælsið hjá kommununum at gera av. Kommunala eftirlitið hevur eisini heimild at gera av ivamál um, hvar mørkini fyri heimildum eftir kommunufulltrúini eru.

**Samanumtikið** eru eyðkennini fyri lokala sjálvræðið,

- at kommunnnar tilverurættur er tryggjaður í grundlóg og stýrisskipanarlóg og byggir á evropeiska demokratiska siðvenju,
- at kommunurnar eru sjálvstøðugar politiskar og fyrisitingarligar eindir við fíggjarligum og politiskum frælsi,
- at kommunurnar hava frælsi at gera egnar raðfestingar í mun til tær uppgávur, tær skulu røkja,
- at kommunur ikki eru undirskipaðir stovnar undir landinum og tískil kann landið ikki geva kommununum bindandi boð,
- at kommunur hava rætt til at útskriva egnar skattir og at nýta hesar inntøkur eftir egnum politiskum raðfestingum.

# 8. Úrslit 2019 og høvuðstøl

Rakstrarútreiðslurnar hjá kommununum vóru samanlagt 2.005 mió. kr. í 2019. Inntøkurnar vóru 2.704 mió. kr. Hetta ber í sær, at rakstrarúrslitið var samanlagt 699 mió. kr.

Íløgurnar vóru samanlagt 892 mió. kr. í 2019, og tað hevur við sær at RLÚ-úrslitið fyri allar kommunur samanlagt verður eitt undirskot á 193 mió. kr. í 2019. Í 2018 var undirskotið 112 mió. kr.

Tað eru tær søguliga stóru íløgurnar – serliga í Tórshavnar kommunu – ið eru orsøk til, at hall hevur verið seinastu 2 árini. Verður einans hugt at sjálvum rakstrinum, so er talan um eitt munagott rakstraravlop, sum er væl størri enn árligu íløgurnar vanliga eru. Talva 2.

Raksturin í 2019 vaks við samanlagt 83 mió. kr. Tað er ein vøkstur á 4,3%. Inntøkurnar vuksu samanlagt 181 mió. kr., sum er ein vøkstur á 7,2%. Íløgurnar vóru 179 mió. kr. størri í 2019 enn í 2018, tað er ein vøkstur á 24%. Talva 3.

**Talva 2**

| | R2016 | R2017 | R2018 | M2019 | J2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstur | 1.757 | 1.808 | 1.922 | 2.005 | 2.118 |
| Inntøkur | 2.308 | 2.453 | 2.523 | 2.704 | 2.643 |
| **Rakstrarúrslit** | **552** | **645** | **600** | **699** | **525** |
| Íløgur | 486 | 518 | 713 | 892 | 813 |
| **RLÚ-úrslit** | **65** | **127** | **-112** | **-193** | **-288** |

**Talva 3**

| | Vøkstur 2018 í mió. kr. | Vøkstur 2018 % | Vøkstur 2019 mió. kr. | Vøkstur 2019 % |
|---|---|---|---|---|
| Rakstur | 115 | 6,3% | 83 | 4,3% |
| Inntøkur | 70 | 2,8% | 181 | 7,2% |
| Íløgur | 195 | 37,6% | 179 | 25,1% |



# 9. Búskaparligu útlitini

Í 2019 var sera stórur vøkstur í skattainntøkunum, og vøksturin sá út til at fara at halda fram í 2020. Vøksturin í samlaða kommunuskattinum fyrsta ársfjórðing í 2020 var 6,4% og í eftirlønarskattinum var vøksturin næstan 9%.

Men Covid-19 kreppan má sigast at hava broytt búskaparligu útlitini grundleggjandi.

Afturat hesum kemur, at hóast vøksturin í inntøkunum, so vóru útlitini fyri 2020 og 2021 longu frammanundan ikki góð. Orsøkin er pensjónsnýskipanin, og tær broytingar, sum sitandi landsstýri hevur framt í skattalóggávuni. Hesar broytingar fara nú at gerast steinur oman á byrðu. Greitt verður nærri frá hesum broytingum niðanfyri.

## Minni inntøkur vegna lógarbroytingar

Løgtingið samtykti fyri jól, at veita skattalætta til lærlingar og fólkapensjónistar, og harumframt fær stigvísi eftirlønarskatturin hjá undanfarnu samgongu fíggjarligan virknað fyri kommunurnar í 2020. Hesar broytingar koma at hava munandi ávirkan á inntøkurnar hjá kommununum komandi árini.

Lærlingar fáa frá 1. januar 2020 ein frádrátt í skattskyldugu inntøkuni á 50.000 kr. árliga. Hetta hevur við sær, at hvør lærlingur kemur at rinda umleið 10 tús. kr. minni í kommunuskatti. Roknað verður við, at uppskotið hevur við sær at inntøkurnar frá kommunuskatti minka við 10 mió. kr.

Fólkapensjónistar fáa frá 1. januar 2020 ein frádrátt í kommunuskattinum á 1.500 kr. árliga, og frá 1. januar 2021 hækkar frádrátturin upp í 3.000 kr. árliga. Uppskotið inniber at hvør pensjónistur kemur at rinda 3.000 kr. minni í kommunuskatti frá 2021 og frameftir. Mett verður, at uppskotið kemur at kosta kommunum 12 mió. kr. í 2020 og 24 mió. kr. í 2021. Havandi í huga, at talið av fólkapensjónistum kemur at vaksa við umleið 70% sum frálíður, verður langtíðar kostnaðurin helst umleið 41 mió. kr.

Í sambandi við pensjónsnýskipanina samtykti undanfarna samgonga at gera eftirlønarskattin stigvísan í mun til inntøku. Broytingin kom í gildi frá 1. januar 2019. Men tekniskt hava Fíggjarmálaráðið og TAKS valt at gera tað soleiðis, at skattur á 40% verður afturhildin í fyrsta umfari, og síðan verður endurgoldið í sambandi við endaligu skattauppgerðina á heysti árið eftir. Tað vil siga, at skatturin fyri árið 2019 er framvegis óbroyttur 40%, men í heyst verður ov nógv uppkravdur skattur í 2019 endurgoldin uppsparara. Hetta hevur við sær, at ein partur av teimum 397 mió. kr., sum kommunurnar hava fingið í eftirlønarskatti í 2019, skal endurrindast í heyst. Tað hevur við sær, at inntøkurnar frá eftirlønarskatti í 2020 verða umleið 19 mió. kr. minni enn annars.

Roknað verður við, at nevndu broytingar samanlagt koma at hava við sær, at inntøkurnar hjá kommunum verða 41 mió. kr. lægri í 2020 enn tær annars vildu verið, og í 2021 verður talan um 54 mió. kr. í minni inntøkum. Ávirkanin sum frálíður, tá talið av pensjónistum veksur við umleið 70%, verður mett at verða 85 mió. kr. árliga. Talva 4.

## Búskaparlig ávirkan vegna Covid-19

Støðan við covid-19 ávirkar kommunurnar fíggjarliga á fleiri økjum. Nakað av ávirkanini er fyribils, og hevur einans ávirkan í sambandi við at átøk standa við, meðan onnur ávirkan er varandi.

Sum heild kann sigast á ávirkanin á útreiðslurnar er fyribils, meðan ávirkanin á inntøkurnar helst fer at gerast meira varandi. Men enn ber hvørki til at siga nakað um, hvussu stór ávirkanin verður og ei heldur, hvussu leingi hon stendur við. Tað veldst eisini í stóran mun um búskapargongdina úti í heimi, og hvussu covid-19 farsóttin fer at hátta sær. Tað eru tó ikki so nógvar orsøkir til at halda, at alt rættar seg aftur beinanvegin. Niðurgongdin verður helst drúgv, spurningurin er bara, hvussu drúgv, og hvussu nógv hetta kemur at ávirka føroyska búskapin.

Meira enn 80% av bruttoinntøkunum hjá kommunum stava frá kommunuskatti og eftirlønarskatti, og hjá fleiri kommunum eru hesar inntøkur næstan øll inntøkan. Niðanfyri verður tí serliga nógv gjørt burturúr at meta um, hvussu júst hesar báðar inntøkur verða ávirkaðar.

Roknað verður við, at ávirkanin, í hvussu er í fyrsta umfari, serliga fer at raka tey økir, har nógv størv eru innan ferðavinnuna. Tað vil siga serliga Vágoynna og Havnina. Um hugt verður eftir hvørji eru í serligu coronaskipanini

**Talva 4**

| (Mió. kr.) | 2020 | 2021 | langtíðar |
|---|---|---|---|
| Minni kommunuskattur vegna frádrátt til lærlingar | 10 | 10 | 10 |
| Minni kommunuskattur vegna frádrátt til pensjónistar | 12 | 24 | 41 |
| Minni eftirlønarskattur vegna stigvísan eftirlønarskatt | 19 | 20 | 34 |
| **Tilsamans** | **41** | **54** | **85** |

hjá ALS, so eru hesi økir eisini yvirumboðað. Hinvegin eru fá í Suðuroynni í skipanini í mun til fólkatalið.

Enn er óvist, hvørjar avleiðingar ein møgulig heimskreppa hevur fyri ali- og fiskivinnuna. Um tað verður truplari at útflyta, og fiskaprísirnar fara at lækka, fer ávirkanin at spjaða seg til allan búskapin, men helst verða Norðuroyggjar og Eysturoyggin serliga hart raktar.

## Ávirkan á kommunuskatt og eftirlønarskatt

Støðan við Covid-19 verður í stóran mun samanborin við fíggjarkreppuna, har heimsbúskapurin í stóran mun steðgaði upp. Júst fíggjarkreppan er eitt dømi um ta sjáldsomu støðu, at inntøkurnar frá kommunuskatti eru lækkaðar. Men henda lækking var tó ikki so ógvuslig, sum ein skuldi væntað. Inntøkurnar frá kommunuskatti lækkaðu einans 0,8% í 2009, meðan lønargjaldingarnar minkaður við heilum 4,5%. Orsøkin var tann, at útgjaldið úr ALS var við til at stabilisera skattagrundarlagið. So lækkingin í 2009 var lítil í mun til afturgongdina, og burtursæð frá fallinum í 2009, so vuksu inntøkurnar frá kommunuskatti rættiliga støðugt árini eftir fíggjarkreppuna.

Tað vil siga, at hóast Covid-19 helst fer at hava við sær, at tann stóri vøksturin, sum hevur verið í skattainntøkunum seinastu árini, fer at halda uppat, so eru sannlíkindini fyri stórari afturgongd í kommunuskattinum og eftirlønarskattinum – hóast alt – ikki serliga stór. Hjálparpakkin tryggjar persónum útgjald úr ALS, ið eru farnir til hús ella niður í tíð vegna Covid-19. Útgjald úr ALS er skattskyldug inntøka og rindar fullan kommunuskatt. Hetta tryggjar, at fallið í skattainntøkum verður væl minni enn fallið í lønargjaldingum.

Men hóast sjálv lækkingin í mun til 2019 kanska ikki er so stór, so er inntøkumissurin hóast tað rættiliga stórur, tí kommunurnar missa allan tann vøkstur, sum annars hevði verið í inntøkunum í 2020.

Í talvuni niðanfyri verður gjørd ein meting av kommunuskattinum og eftirlønarskattinum í 2020. Fyrst verður mett um, hvat inntøkurnar høvdu verið uttan Covid-19 og uttan lógarbroytingar. Síðan verður rættað fyri lógaruppskotum og afturgongd vegna Covid-19. Mett verður, at lækkingin í kommunuskattinum verður tann sami sum undir fíggjarkreppuni. Tað vil siga, at afturgongdin verður tann sama frá 2019 til 2020, sum hon var frá 2008 til 2009. Talva 5.

Kommunuskatturin var 2.040 mió. kr. í 2019 og roknað verður við, at kommunuskatturin hevði verið umleið 2.183 mió. kr. um ongar lógarbroytingar ella covid-19 vóru.

Um mett verður, at afturgongdin í kommumuskattinum verður tann sama sum undir fíggjarkreppuni, so má roknast við, at kommunuskatturin verður umleið 159 mió. kr. minni. Harafturat kemur missur vegna lógarbroyingar á 22 mió. kr. Talan verður sostatt um minking samanlagt á 181 mió. kr. Samanlagt verður tí roknað við kommunuskatti á 2.002 mió. kr. í 2020. Tað er 38 mió. kr. ella 1,9% minni enn í 2019.

Viðvíkjandi eftirlønarskatti verður roknað við afturgongd á samanlagt 58 mió. kr. Harav stava 39 mió. kr. frá afturgongd vegna Covid-19 og 19 mió. kr. vegna stigvísan eftirlønarskatt. Samanlagt verður roknað við eftirlønarskatti á 375 mió. kr. í 2020. Tað er 22 mió. kr. ella 5,6% minni enn í 2019.

Tað vil siga, at mett verður at Covid-19 í 2020 kemur at kosta kommununum samanlagt næstan 200 mió. kr. í mistum inntøkum frá kommunuskatti og eftirlønarskatti.

## Afturbering fyri frádráttir og serskattaskipanir

Afturberingin verður roknað eftir, hvat serskipanin kostaði annað árið fyri, og verður tí ikki ávirkað í 2020.

## Partafelagsskattur

Roknast má við munandi lækking í inntøkunum frá felagsskattinum komandi árini. Stór afturgongd í vinnuni hevur við sær tap, sum kunnu dragast frá í skattskyldugu inntøkuni komandi árini. Hetta ber í sær, at tað ofta tekur nógv ár, áðrenn felagsskatturin økist aftur.

Felagsskatturin, sum verður rindaður í heyst, er fyri inntøkuárið 2019, so Covid19 ávirkanin ger seg ikki galdandi fyrr enn í 2021, tá skattur skal rindast av inntøku, sum er forvunnin í 2020.

Roknað verður við, at partafelagsskatturin helst verður helvtina minni í 2021. Tað hevur við sær, at kommunurnar fáa 80 mió. kr. minni í inntøkum í 2021.

Talva 5

| | R2019 | Inntøkur uttan Covid-19 og lógaruppskot | Lækking vegna covid-19 | Lækkeing vegna lógarbroytingar | Lækking íalt | Inntøkur við Covid-19 og lógaruppskotum |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kommunuskattur | 2.040 | 2.183 | 159 | 22 | 181 | 2.002 |
| Eftirlønarskattur | 397 | 433 | 39 | 19 | 58 | 375 |
| **Íalt** | **2.437** | **2.616** | **198** | **41** | **239** | **2.377** |





*Heimið á Grønanesi í Vestmanna*

## Brúkaragjøld dagstovnar

Enn hava ikki allar kommunur tikið støðu til, um brúkaragjøld verða endurrindað vegna tiltøk. Men verður tað gjørt, verður talan um umleið 8 mió. kr. fyri tann mánaðin, børnini vóru heima.

## Havnagjøld

Covid-19 fer at hava munandi ávirkan á inntøkurnar frá havnagjøldum. Núverandi støða heldur cruise-skipum burtur, og gerst støðan til eina veruliga kreppu, kann innog útflutningsvirðið minka munandi. Tað eru serliga Tórshavn, Runavík og Fuglafjørður, sum hava stórar inntøkur frá havnargjøldum. Men eisini Klaksvík og Tvøroyri hava munandi inntøkur.

## Eldraútreiðslur

Tað er greitt, at Covid19 helst fer at økja um eldraútreiðslurnar. Fyrstu metingarnar benda á, at tiltøkini hava við sær meirútreiðslur á 6-9%. Tað samsvarar við góðar 3 mió. kr. um mánaðin. Standa tiltøkini við longi, kann sostatt gerast talan um munandi meirútreiðslu.

# 10. Inntøkur

Samlaðu inntøkurnar hjá kommununum vóru 2,7 mia. kr. í 2019.

Størsti parturin av inntøkunum hjá kommununum stava frá kommunuskatti. Í 2019 var talan um 2.040 mió. kr., og tað er umleið 3/4 av samlaðu inntøkunum.

Inntøkurnar frá skatti av inngjøldum til eftirløn hava síðan eldraøkið var lagt út í 2015 verið ein munandi og vaksandi partur av kommunalu inntøkunum. Í fjør gjørdist talan um 397 mió. kr., og tað er 15% av samlaðu inntøkunum. Sí talvu 6.

Restin av inntøkunum stava frá felagsskattinum, sum var 159 mió. kr., og afturbering fyri serskipanir, sum var 108 mió. kr. Hetta samsvarar við ávikavist 6% og 4% av inntøkunum.

Inntøkurnar vuksu við samanlagt 181 mió. kr. í 2019, tað er 7,2%. Hetta má sigast at verða ein stórur vøkstur. Talva 7.

Í 2018 var vøksturin lutfalsliga lágur, einans 70 mió. kr. ella 2,8%. Høvuðsorsøkin var skattalættin til fyritíðarpensjónistar, sum hevði við sær, at kommunurnar mistu 25 mió. kr. í skattainntøkum. Men eisini var ein lækking í inntøkunum frá felagsskattinum í mun til 2017, tá inntøkurnar frá felagsskatti vóru søguliga stórar.

## Kommunuskattur

Kommunuskattur verður rindaður av skattskyldugu inntøkuni omanfyri botnfrádráttin á 30 tús. kr. Botnfrádrátturin er ásettur í §46 í skattalógini, og hevur hevur verið óbroyttur síðan 2008. Frá útroknaða skattin verður frádrigin ein barnafrádráttur, ið kommunustýrið sjálvt ásetur.

Talva 6

| | R2016 | R2017 | R2018 | M2019 | J2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Kommunuskattur | 1.766 | 1.844 | 1.896 | 2.040 | 2.025 |
| Felagsskattur | 118 | 179 | 163 | 159 | 129 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 292 | 321 | 352 | 397 | 386 |
| Aðrar inntøkur | 0 | -6 | -1 | -2 | -2 |
| Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir | 120 | 115 | 113 | 109 | 105 |
| Tíðaravmarkað flyting vegna eldraøkið | 13 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **2.308** | **2.453** | **2.523** | **2.704** | **2.643** |

Talva 7

| | Vøkstur 2018 | Vøkstur 2018 | Vøkstur 2019 | Vøkstur 2019 |
|---|---|---|---|---|
| Kommunuskattur | 52 | 2,8% | 144 | 7,6% |
| Felagsskattur | -16 | -8,9% | -3 | -2,3% |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 31 | 9,7% | 46 | 12,9% |
| Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir | -2 | -1,9% | -4 | -3,9% |
| **Tilsamans** | **70** | **2,8%** | **181** | **7,2%** |

Talva 8

Broytingar í skattaprosentinum 2020

| Kommuna | 2019 | 2020 | Lækking |
|---|---|---|---|
| Fámjins | 17,00 | 16,00 | 1,00 |
| Sørvágs | 21,70 | 21,00 | 0,70 |
| Skopunar | 21,50 | 21,00 | 0,50 |
| Vágs | 21,95 | 21,65 | 0,30 |
| Runavíkar | 22,00 | 21,75 | 0,25 |
| Sands | 21,00 | 20,75 | 0,25 |
| Hvalbiar | 19,85 | 19,75 | 0,10 |

Talva 9

| Kommuna | 2019 | 2020 | Hækking |
|---|---|---|---|
| Hovs | 6.000 | 7.500 | 1.500 |
| Fuglafjarðar | 6.500 | 7.500 | 1.000 |
| Vágs | 4.500 | 5.500 | 1.000 |
| Porkeris | 7.000 | 7.500 | 500 |
| Skálavíkar | 6.500 | 6.000 | -500 |
| Sumbiar | 6.500 | 6.000 | -500 |

## Skattaprosent

Skattaprosentini hjá kommunum mugu sum heild sigast at vera lækkandi, og gongdin heldur fram í 2020. Í 2010 rindaðu føroyingar í miðal 21,37% í kommunuskatti og í 2020 er talið lækkað niður í 20,17%. Sostatt er talan eina minking á samanlagt 1,2% síðan 2010. Eisini er spjaðingin vorðin minni. Fyri 10 árum síðani rindaðu fólk upp í 23,5% í kommunuskatti, nú rindar ongin meira enn 22 prosent.

Í 2020 lækkaði skattaprosentið í 7 kommunum, og ongin kommuna hevur hækkað skattaprosentið. Talva 8.

## Barnafrádráttur

Barnafrádrátturin er sum heild hækkandi. Fyri 10 árum síðan var barnafrádrátturin í miðal slakar 5.000 kr. Nú er hann stívligar 7.000 kr. í miðal. Fyri 10 árum síðani var lægsti barnafrádráttur 3000 kr., nú er lægsti barnafrádráttur 5.000 kr.

Í 2020 hækkaði barnafrádrátturin í 4 kommunum, meðan hann lækkaði í tveimum kommunum. Talva 9.

## Skattagrundarlag

Grundarlagið undir kommunuskattinum er rættiliga ymiskt kring landið. Tað, sum serliga kann minka um grundarlagið undir kommunuskattinum er, um nógvir pensjónistar búgva í kommununi, tí fólka- og fyritíðarpensjón eru næstan skattafrí. Men eisini hevur tað stóra ávirkan, um nógv arbeiða uttanlands ella eru undir serskipanum sum FAS og DIS.

Eisini fiskimenn rinda lægri skatt vegna fiskimannafrádrátt, men hinvegin eru fiskivinnuinntøkur vanliga so høgar, at tað sæst ikki aftur. Heldur hinvegin, so sær tað út til at økja munandi um grundarlagið, har sum nógvir fiskimenn búgva. Serliga um teir fiska við uppsjóvarskipum ella stóru verksmiðjutrolarnum.

Í talvu 10 á næstu síðu er víst skattagrundarlagið fyri hvønn íbúgva í 2019 fyri allar 29 kommunurnar. Sum víst er grundarlagið í miðal fyri alt landið 205 tús. kr. fyri hvønn íbúgva. Men stórir munir eru. Tað sæst, at grundarlagið er serliga stórt í Norðuroyggjum, í Tórshavn og í norðara parti av Eysturoynni. Nógv størst er grundarlagið í Fugloynni, heilar 473 tús. kr. fyri hvønn í búgva.

Hinvegin er grundarlagið lítið í Suðuroynni og Sandoynni. Minst er tað í Sumba við 145 tús. kr. fyri hvønn íbúgva. Í restini av landinum er grundarlagið nakað undir miðal.

## Felagsskattur

Sambært §5 í Ásetingarlógini fellur 70% av felagsskattinum til landið og 30% til kommunurnar. Skatturin fellur ymiskt alt eftir hvar í landinum feløg eru heimahoyrandi. Tó rinda peningastovnar, tryggingarfyritøkur, telesamskiftisfyritøkur, oljusølufyritøkur og vinnurekandi grunnar skatt til allar kommunur. Talva 11 á síðu 33.

Tað er sera ymiskt hvussu felagsskatturin hilnast kommununum. Seinastu árini hava serliga tær kommunur har alivirksemi er, og har uppsjóvarfeløg eru heimahoyrandi, fingið væl av inntøku. Mestu inntøku pr. íbúgva í 2019 fekk Fuglafjørður, har inntøkan samsvaraði við meira enn 12 tús. kr. fyri hvønn íbúgva. Miðalinntøkan fyri hvønn íbúgva var 3.100 kr. Hinvegin fingu tær kommunur, har inntøkan var minst, niður ímóti 400 kr. pr. íbúgva.

## Skattur av eftirlønarinngjøldum

Sambært §12, stk. 1 í Eftirlønarlógini fellur skatturin av inngjøldum til pensjón til kommunurnar eftir talinum av persónum 67 ár ella eldri. Tó so, at talið av borgarum 67 ár ella eldri í Sandoynni verður hækkað við 30%, um heimatænasta, eldrarøkt v.m. í Sandoynni verður rikið í serstøkum samstarvsøki.

Skatturin fellur serliga til tær kommunur, har nógv eldri búgva, og tað eru yvirhøvur kommunur í Suðuroynni og Sandoynni. Mest pr. íbúgva í 2019 fór til Húsavíkar kommunu við næstan 20.400 kr. fyri hvønn íbúgva. Miðal fyri landið var umleið 7.750 kr. fyri hvønn íbúgva. Minst fekk Kunoyar kommuna við gott 6.100 kr. fyri hvønn íbúgva. Talva 12 og á síðu 34-35.

## Afturbering vegna DIS, FAS og frádráttir

Í sambandi við, at kommunurnar yvirtóku eldraøkið frá 1. januar 2015 var ásett *í Løgtingslóg nr. 136 frá 19. desember 2014 um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir,* at Kommunurnar árliga fáa eina upphædd, ið samsvarar við 19,1% av:

- DIS-inntøku
- FAS-inntøku
- Fiskimannafrádráttinum (§25a)
- Uttanlandsfrádráttinum (§25b)

Endurgjaldið verður latið kommunum eftir bústað hjá viðkomandi skattgjaldara.

Nógv mest í 2019 fekk Skálavíkar kommuna við næstan 8 tús. kr. fyri hvønn íbúgva. Minst fekk Skúvoyar kommuna við einans 300 kr. fyri hvønn íbúgva. Í 2019 var talan um í miðal 2100 kr. pr. í búgva.

**Talva 10**

Kommunuskattagrundarlag pr. íbúgva í 2019 (1.000 kr.)




**Talva 11**

Felagsskattur pr. íbúgva 2019, (kr.)



**Talva 12**

Eftirlønarskattur pr. íbúgva í 2019. (kr.)




**Talva 13**

Afturbering frá landinum pr. íbúgva í 2019. (kr.)



# 11. Rakstrarútreiðslur

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununum vóru 2.005 mió. kr. í 2019. Í 2018 vóru samlaðu rakstrarútreiðslurnar 1.922 mió. kr. Vøksturin er 62 mió. kr., ið samsvar við 4,3%. Hetta kann ikki sigast at verða nakar stórur vøkstur, um havt verður í huga, at vøksturin í almennu sáttmálalønunum var 2,5% í 2019 og fólktatalið vaks við 1,7%. Talva 14.

Sum víst niðanfyri er tað serliga økið børn og ung, sum hevur við sær eitt týðandi vakstraríkast. Orsøkin er stóra fólkatilflytingin, sum hevur við sær størri útreiðslur til barnaansing, harumframt kemur so ein lækking í ansingargjøldum. Ein orsøk til at rakstrarvøksturin ikki var lágur í 2019 var tann, at rentuútreiðslurnar lækkaðu niður í eina helvt í 2019. Annars hevði vøksturin verið 5,2%. Tað er serliga í Runavík og Tórshavn at rentuútreiðslurnar eru lækkaðar. Talva 15.

Talva 14

| | R2016 | R2017 | R2018 | M2019 | J2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Kommunal fyrisiting | 187 | 199 | 203 | 217 | 225 |
| Almanna- og heilsumál | 576 | 593 | 634 | 663 | 696 |
| Børn og ung | 357 | 370 | 405 | 444 | 463 |
| Undirvísing | 135 | 133 | 141 | 140 | 148 |
| Mentan og frítíð | 114 | 128 | 131 | 133 | 145 |
| Teknisk mál | 246 | 235 | 261 | 260 | 273 |
| Kommunal virki | 78 | 86 | 84 | 100 | 112 |
| Íbúðarmál | 36 | 36 | 36 | 36 | 36 |
| Rentur | 28 | 28 | 27 | 13 | 21 |
| **Tilsamans** | **1.757** | **1.808** | **1.922** | **2.005** | **2.118** |

Talva 15

| | R2018 | R2019 | Vøkstur | Vøkstur | Íkast |
|---|---|---|---|---|---|
| Kommunal fyrisiting | 203 | 217 | 14 | 6,9% | 0,7% |
| Almanna- og heilsumál | 634 | 663 | 29 | 4,5% | 1,5% |
| Børn og ung | 405 | 444 | 39 | 9,7% | 2,0% |
| Undirvísing | 141 | 140 | -1 | -0,5% | 0,0% |
| Mentan og frítíð | 131 | 133 | 2 | 1,2% | 0,1% |
| Teknisk mál | 261 | 260 | -1 | -0,4% | 0,0% |
| Kommunal virki | 84 | 100 | 16 | 18,7% | 0,8% |
| Íbúðarmál | 36 | 36 | 0 | 0,4% | 0,0% |
| Rentur | 27 | 13 | -14 | -52,4% | -0,7% |
| **Tilsamans** | **1.922** | **2.005** | **83** | **4,3%** | **4,3%** |



# 12. Íløgur

Kommunalu íløgurnar hava verið søguliga stórar seinastu 2 árini. Samanlagt varð talan um 892 mió. kr. í 2019, og í 2018 var talan um 713 mió. kr. Høvuðsorsøkin er stórar íløgur í Tórshavnar kommunu á 350-400 mió. kr. seinastu 2 árini. Talva 16.

Stóru íløguøkini seinnu árini eru havnir og skúlar. Serliga stóra havnaútbyggingin í Tórshavn sæst aftur, men eisini eru munandi havnaíløgur gjørdar í Runavík seinastu árini. Harumframt eru stórar íløgur í skúlar í Tórshavn, Klaksvík, Fuglafirði og í Sunda kommunu. Talva 17.

Annars eru seinnu árini eisini gjørdar stórar íløgur á ítróttarøkinum. Íløgur í ítróttaranlegg eru gjørdar á Eiði, í Vági, Klaksvík, Fuglafirði, Tórshavn og Sundalagnum.

Talva 16

| | R2016 | R2017 | R2018 | M2019 | J2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Kommunal fyrisiting | 8 | 13 | 3 | 22 | 5 |
| Almanna- og heilsumál | 26 | 4 | 10 | 36 | 88 |
| Børn og ung | 31 | 22 | 22 | 58 | 58 |
| Undirvísing | 59 | 132 | 151 | 215 | 231 |
| Mentan og frítíð | 76 | 120 | 119 | 136 | 91 |
| Teknisk mál | 165 | 85 | 184 | 215 | 186 |
| Kommunal virki | 122 | 143 | 223 | 211 | 154 |
| **Tilsamans** | **486** | **518** | **713** | **892** | **813** |

Talva 17

Íløgur í kommununum 2016–2019. (Mió. kr.)



# 13. Fíggjarstøðan

Samlaða bruttoskuldin hjá kommunum var slakar 1,3 mia. kr. við ársenda 2019. Harav var langfreistaða skuldin 996 mió. kr. og stuttfreistaða skuldin var 280 mió. kr. Talva 18.

Tá nettoskuldin verður uppgjørd, verða tøkur peningur og onnur fíggjarlig áogn frádrigin bruttoskuldini. Samlaða nettoskuldin var 450 mió. kr.

Nettoskuldin er av serliga stórum áhuga í kommunalum høpi, tí hon avger í hvønn mun kommunan kann upptaka skuld. Í § 43, stk. 2 í Kommunustýrislógini er ásett, at:

"Er nettoskuldin meira enn ein álíkning eftir einum av landsstýrismanninum árliga ásettum skattaprosenti, krevst loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum".

Tað vil siga, at um nettoskuldin er omanfyri eina álíkning, so kann kommunan ikki sjálv ráða yvir sínum skuldarviðurskiftum. Sum víst omanfyri so liggur Vágs kommuna eitt vet omanfyri markið. Hinar liggja allar væl niðanfyri. Í miðal samsvarar nettoskuldin við 19% av eini álíkning við skattaprosentið á 23%.

Kommunala skuldin hevur í nógv ár verið í minking. Men í sambandi við at undirskot nú hava verið tvey ár á rað, er skuldin økt eitt vet.

Men hinvegin kann tað staðfestast, at skuldarstøðan hjá kommunum sjáldan fyrr hevur verið so góð sum nú. Samlaða nettoskuldin samsvarar einans við 2% av BTÚ. Fyri 10 árum síðani var talan um 6% av BTÚ, og verður farið aftur til 1998 var talan um heili 16% av BTÚ. Samlaða nettoskuldin er sostatt lág í mun til støddina á búskapinum.

Eisini má staðfestast, at nú eru ongar kommunur, sum hava heilt stóra skuld. Fyri 20 árum síðani vóru fleiri kommunur, sum skyldaðu fleiri ferðir eina álíkning.

Fíggjarstøðan hjá kommununum má tí samanumtikið sigast at vera søguliga góð.

Talva 18

| Kommuna | Langfreistað skuld | Stuttfreistað skuld | Bruttoskuld | Nettoskuld | Nettoskuld í mun til álíkning (23%) | Nettoskuld pr.íbúgva |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vágs kommuna | 60.156 | 2.108 | 62.264 | 54.775 | 1,10 | 40.514 |
| Skopunar kommuna | 10.811 | 943 | 11.754 | 10.419 | 0,64 | 23.680 |
| Tvøroyrar kommuna | 51.999 | 7.246 | 59.245 | 40.492 | 0,61 | 23.624 |
| Runavíkar kommuna | 124.796 | 19.282 | 144.078 | 100.490 | 0,56 | 24.185 |
| Klaksvíkar kommuna | 157.351 | 31.482 | 188.833 | 120.828 | 0,50 | 23.015 |
| Vestmanna kommuna | 0 | 33.031 | 33.031 | 25.613 | 0,49 | 20.573 |
| Fuglafjarðar kommuna | 87.053 | 9.466 | 96.519 | 33.967 | 0,47 | 21.376 |
| Sjóvar kommuna | 23.060 | 10.085 | 33.145 | 23.514 | 0,47 | 21.592 |
| Nes kommuna | 30.372 | 4.465 | 34.837 | 24.868 | 0,44 | 18.586 |
| Vága kommuna | 44.287 | 6.375 | 50.662 | 32.510 | 0,38 | 15.256 |
| Kvívíkar kommuna | 9.572 | 5.404 | 14.976 | 9.629 | 0,36 | 16.129 |
| Hvalbiar kommuna | 12.314 | 984 | 13.298 | 8.066 | 0,31 | 11.879 |
| Sunda kommuna | 38.501 | 17.255 | 55.756 | 22.887 | 0,28 | 12.638 |
| Sørvágs kommuna | 23.918 | 5.343 | 29.261 | 13.607 | 0,26 | 11.018 |
| Eiðis kommuna | 7.981 | 2.175 | 10.156 | 5.054 | 0,16 | 6.641 |
| Sumbiar kommuna | 3.083 | 427 | 3.510 | 1.789 | 0,16 | 4.997 |
| Sands kommuna | 14.500 | 2.374 | 16.874 | 2.691 | 0,14 | 5.058 |
| Porkeris kommuna | 3.095 | 618 | 3.713 | 592 | 0,05 | 1.862 |
| Eystur kommuna | 15.330 | 10.100 | 25.430 | 4.050 | 0,04 | 1.878 |
| Tórshavnar kommuna | 253.779 | 108.530 | 362.309 | -47.688 | -0,05 | -2.171 |
| Hovs kommuna | 2.389 | 446 | 2.835 | -183 | -0,06 | -1.848 |
| Skálavíkar kommuna | 1.590 | 35 | 1.625 | -395 | -0,07 | -2.743 |
| Viðareiðis kommuna | 10.172 | 607 | 10.779 | -4.071 | -0,23 | -11.766 |
| Famjins kommuna | 1.202 | 26 | 1.228 | -954 | -0,30 | -11.494 |
| Kunoyar kommuna | 15 | 279 | 294 | -4.384 | -0,56 | -28.103 |
| Skúvoyar kommuna | 0 | 53 | 53 | -1.126 | -0,61 | -28.150 |
| Hvannasunds kommuna | 7.273 | 994 | 8.267 | -13.488 | -0,73 | -32.423 |
| Húsavíkar kommuna | 0 | 1 | 1 | -6.079 | -1,56 | -52.861 |
| Fugloyar kommuna | 1.351 | 148 | 1.499 | -7.031 | -1,75 | -185.026 |
| **Alt landið** | **995.950** | **280.282** | **1.276.232** | **450.442** | **0,19** | **8.637** |




*Sandoyartunnilin*

# 14. Gongdin í fólkatalinum

Tann 1. januar 2020 búðu íalt 52.154 fólk í Føroyum. Av hesum búðu næstan 22 tús. í Tórshavnar kommunu. Tað eru stívliga 42% av fólkinum. Næststørsta kommunan eftir fólkatali er Klaksvíkar kommuna, har búðu samanlagt 5.250 fólk, ella góð 10% av fólkinum. Tað vil siga, at meira enn helmingurin av øllum føroyingum búgva antin í Klaksvíkar ella í Tórshavnar kommunu. Minstu kommunur eftir fólkatali eru Fugloyar og Skúvoyar kommunur. Har búðu ávikavist 38 og 40 fólk tann 1 jan. 2020.

Sum víst í talvu 19 er fólkatalið vaksið við meira enn 6.800 fólkum seinastu 20 árini, men vøksturin hevur verið rættiliga ójavnt býttur millum kommunurnar. Sum heild kann sigast, at nærum allur vøksturin fer fram í Streymoynni, Eysturoynni og í Vágum. Í Suðuroynni og Sandoynni er minking í øllum kommunum. Í Norðoyggjum er sum heild vøkstur, men hann er ikki stórur.

Fólkatalið er vaksið nógv seinastu 5 árini. Seinasta uppgerð av fólkatalinum er frá 1. mars 2020. Tá búðu 52.337 fólk í Føroyum. Hetta er nógv tað mesta nakrantíð. Vøksturin byrjaði í 2013, og síðan hevur verið talan um ein rættiliga støðugan vøkstur á umleið 1,5% árliga. Orsøkirnar eru høga tilflytingin og lága fráflytingin. Talva 20.

Broytingar í fólkatalinum stava frá fýra ymiskum orsøkum: føðing, deyða, tilflyting og fráflyting. Munurin millum talið av livandi føddum og talið av deyðum nevnist *burðaravlopið*. Munurin millum tal av tilfluttum og talið av fráfluttum er *nettotilflytingin*.

Niðanfyri verður hugt at gongdini í fólkatalinum kring landið seinnu árini. Broytingarnar verða lýstar í mun til 7 økir ella landslutir í staðin fyri kommunur. Orsøkin er, at stóra talið av kommunu hevði gjørt slíka frágreiðing alt ov rúgvismikla. Eisini er tað soleiðis, at gongdin í hvørjari einstakari kommunu er rættiliga eins í hvørjum øki.

**Talva 19**

| Kommuna | Fólkatal 1. jan. 2000 | Fólkatal 1. jan 2020 | Vøkstur 2000 til 2020 | %-býtið 1. jan. 2020 |
|---|---|---|---|---|
| Tórshavnar kommuna | 17.890 | 21.967 | 4.077 | 42,0% |
| Klaksvíkar kommuna | 4.873 | 5.250 | 377 | 10,0% |
| Runavíkar kommuna | 3.397 | 4.155 | 758 | 8,0% |
| Eystur kommuna | 1.773 | 2.156 | 383 | 4,0% |
| Vága kommuna | 1.640 | 2.131 | 491 | 4,0% |
| Sunda kommuna | 1.386 | 1.811 | 425 | 3,0% |
| Tvøroyrar kommuna | 1.783 | 1.714 | -69 | 3,0% |
| Fuglafjarðar kommuna | 1.498 | 1.589 | 91 | 3,0% |
| Vágs kommuna | 1.403 | 1.352 | -51 | 3,0% |
| Nes kommuna | 1.118 | 1.338 | 220 | 3,0% |
| Vestmanna kommuna | 1.210 | 1.245 | 35 | 2,0% |
| Sørvágs kommuna | 973 | 1.235 | 262 | 2,0% |
| Sjóvar kommuna | 1.007 | 1.089 | 82 | 2,0% |
| Eiðis kommuna | 687 | 761 | 74 | 1,0% |
| Hvalbiar kommuna | 776 | 679 | -97 | 1,0% |
| Kvívíkar kommuna | 554 | 597 | 43 | 1,0% |
| Sands kommuna | 557 | 532 | -25 | 1,0% |
| Skopunar kommuna | 489 | 440 | -49 | 1,0% |
| Hvannasunds kommuna | 441 | 416 | -25 | 1,0% |
| Sumbiar kommuna | 403 | 358 | -45 | 1,0% |
| Viðareiðis kommuna | 318 | 346 | 28 | 1,0% |
| Porkeris kommuna | 357 | 318 | -39 | 1,0% |
| Kunoyar kommuna | 136 | 156 | 20 | 0,0% |
| Skálavíkar kommuna | 162 | 144 | -18 | 0,0% |
| Húsavíkar kommuna | 152 | 115 | -37 | 0,0% |
| Hovs kommuna | 119 | 99 | -20 | 0,0% |
| Fámjins kommuna | 116 | 83 | -33 | 0,0% |
| Skúvoyar kommuna | 85 | 40 | -45 | 0,0% |
| Fugloyar kommuna | 40 | 38 | -2 | 0,0% |
| **Alt landið** | **45.343** | **52.154** | **6.811** | **100,0%** |

## Norðoyggjar

Stórur fólkavøkstur hevur verið í Norðoyggjum síðan 2014. Fólkatalið er vaksið við 361 síðan 2014, ella umleið 60 árliga, og er nú tað hægsta nakrantíð – hægri enn áðrenn kreppuna í nítiárunum. Góða gongdin í fiskivinnuni í Klaksvík er uttan iva ein orsøk. Talva 21 og 22.

Størsti parturin av vøkstrinum stavar frá tilflyting úr útlandinum. Síðan 2014 eru 275 fleiri flutt til Norðoyggjar úr útlondum, enn tað eru flutt úr Norðoyggjum í útlond. Hinvegin er innanlands flytingin framvegis negativ. Síðan 2014 eru 49 fleiri flutt úr Noroyggjum til onnur øki í landinum, enn tað eru flutt til Norðoyggjar. Norðoyggjar hava framvegis eitt munandi burðaravlop. Samlaða burðaravlopið síðan 2014 er 135. Við komandi Eysturoyartunlinum verður Klaksvíkin av álvara ein partur av miðstaðarøkinum, og hetta átti at eggjað til tilflyting.

**Talva 20**

Fólkatalið í Føroyum




**Talva 21**

Fólkatal í Norðoyggjum - 1985-2020




**Talva 22**

| Norðoyggjar 2014-2019 | |
|---|---|
| Burðaravlop | 135 |
| Nettoflyting uttanlands | 275 |
| Nettoflyting innanlands | -49 |
| **Vøkstur íalt** | **361** |
| **Vøkstur í miðal árliga** | **60** |

# Eysturoy

Fólkatalið í Eysturoynni er vaksið skjótt síðan 2014. Fólkatalið er vaksið við stívliga 1.200 fólkum síðan 2014, ella gott 200 árliga. Fólkatalið nærkast 12.000, og er nú nógv tað hægsta nakrantíð. Eysturoyartunnilin, ið møguliga letur upp í ár, er uttan iva ein orsøk til góðu gongdina. Eysturoyggin er nú vorðin eitt alternativ sum bústaðarøki í mun til Havnina. Eisini hevur oyggin eitt blómandi vinnulív, bæði innan ali- og fiskivinnu, og eisini innan vinnuligar tænastur. Talva 23 og 24.

Nógv tann størsti parturin av vøkstrinum stavar frá tilflyting úr útlandinum. Síðan 2014 eru 730 fleiri flutt til Eysturoynna, enn tað eru flutt úr Eysturoynni í útlond. Men eisini er nakað av tilflyting innanlands. Síðan 2014 eru 64 fleiri flutt í Eysturoynna úr øðrum økjum í landinum, enn tað eru flutt úr Eysturoynni. Oyggin hevur framvegis eitt stórt burðaravlop. Samlaða burðaravlopið síðan 2014 er 428.

# Norðstreymoy

Hóast Norðstreymoy er í stuttari fjarstøðu frá Havnini, so hevur økið ikki í sama mun sum t.d. Vágar, megna at drigið fólk til sín seinastu 20 árini. Men seinastu árini hevur gongdin verið góð, og fólkatalið í Norðstreymoy nærkast nú 4000 fólkum. Tað er tað hægsta nakrantíð. Síðan 2014 er fólkatalið økt við 250 fólkum, ella í miðal 42 árliga. Talva 25. og 26.

Gott helvtin av vøkstrinum stavar frá tilflyting úr útlandinum. Síðan 2014 eru 136 fleiri flutt til Norðstreymoy, enn tað eru flutt úr Norðstreymoy í útlond. Hinvegin er innanlands flytingin negativ. Síðan 2014 eru 12 fleiri flutt úr Norðstreymoy til onnur øki í landinum, enn tað eru flutt til Norðstreymoy. Norðstreymoy hevur framvegis eitt lutfalsliga stórt burðaravlop. Samlaða burðaravlopið síðan 2014 er 126.

Talva 23

Fólkatal í Eysturoy - 1985-2020




Talva 24

| Eysturoy 2014-2019 | |
|---|---|
| Burðaravlop | 428 |
| Nettoflyting uttanlands | 730 |
| Nettoflyting innanlands | 64 |
| **Vøkstur íalt** | **1.222** |
| **Vøkstur í miðal árliga** | **204** |

Talva 25

Fólkatal í Norðurstreymoy - 1985-2020




Talva 26

| Norðurstreymoy 2014-2019 | |
|---|---|
| Burðaravlop | 126 |
| Nettoflyting uttanlands | 136 |
| Nettoflyting innanlands | -12 |
| **Vøkstur íalt** | **250** |
| **Vøkstur í miðal árliga** | **42** |



# Suðurstreymoy

Sum høvuðsstaður og umsitingarligur miðdepil fyri m.a. landsumsitingina, almennar tænastustovnar og stórar privatar tænastufyritøkur er arbeiðsmarknaðurin í miðstaðarøkinum fjøltáttaður og innbjóðandi fyri fólk við útbúgving. Hetta dregur fólk til miðstaðarøkið, serliga uttanífrá (fólk flyta til Havnar eftir lokna útbúgving), men eisini innanoyggja. Hesi viðurskifti síggjast aftur í gongdini í fólkatalinum.

Fólkatalið í Suðurstreymoy varð ikki so nógv ávirkað av fíggjarkreppuni sum restin av landinum. Fólkatalið hevur, so at siga, verið í vøkstri øll árini. Orsøkin til tað er tann, at Tórshavnarøkið altíð hevur stóra tilflyting úr restini av landinum, tá krepputíðir eru. Talva 27 og 28.

Fólkatalið er vaksið við næstan 2.000 síðan 2014. Nógv tann størsti parturin av vøkstrinum stavar frá tilflyting úr útlandinum. Síðan 2014 eru meira enn 1.100 fleiri flutt til Suðurstreymoy, enn tað eru flutt úr Suðurstreymoy í útlond. Men hinvegin er tilflytingin innanlands lítil. Suðurstreymoy hevur eitt stórt burðaravlop. Samlaða burðaravlopið síðan 2014 er næstan 800.

# Vágar

Vágar eru tað økið í landinum uttanfyri miðstaðarøkið, sum hevur havt bestu gongd í fólkatalinum síðan kreppuna fyrst í nítiárunum. Millum orsøkirnar er helst samanrenningin av Vágatunlinum og einum vøkstri í ferðavinnuni. Við Vágatunlinum er so stutt til arbeiðsmarknaðin í Havn, at tað ber væl til at at búgva í Vágum og koyra til arbeiðis í Havn. Eisini stóri vøksturin í talinum av størvum í ferðavinnuni, serliga kring virksemi hjá Vága Floghavn og Atlantsflog, hevur uttan iva eisini ávirkan á gongdin í fólkatalinum í Vágum. Talva 29 og 30.

Talva 27

Fólkatal í Suðurstreymoy - 1985-2020




Talva 28

| Suðurstreymoy 2014-2019 | |
|---|---|
| Burðaravlop | 793 |
| Nettoflyting uttanlands | 1.134 |
| Nettoflyting innanlands | 43 |
| **Vøkstur íalt** | **1.970** |
| **Vøkstur í miðal árliga** | **328** |

Talva 29

Fólkatal í Vágum - 1985-2020




Talva 30

| Vágar 2014-2019 | |
|---|---|
| Burðaravlop | 105 |
| Nettoflyting uttanlands | 136 |
| Nettoflyting innanlands | 72 |
| **Vøkstur íalt** | **313** |
| **Vøkstur í miðal árliga** | **328** |

Vágoyggin megnaði at halda eitt støðugt fólkatal eftir fíggjarkreppuna. Fólkatalið er vaksið við 313 fólkum síðan 2014, og er nú tað hægsta nakrantíð.

Næstan helvtin av vøkstrinum stavar frá tilflyting úr útlandinum. Síðan 2014 eru meira enn 136 fleiri flutt til Vágar úr útlondum, enn tað eru flutt úr Vágum í útlond. Eisini innanlands tilflytingin er lutfalsliga stór. Heili 72 fleiri eru flutt til Vágar frá øðrum økjum í landinum, enn tað eru flutt úr Vágum í aðrar partar av landinum. Vágoyggin hevur eitt lutfalsliga stórt burðaravlop. Samlaða burðaravlopið síðan 2014 er 105.

## Sandoyar økið

Gongdin í Sandoynni hevur síðan kreppuna í nítiárunum verið merkt av fráflyting. Síðan seinast í áttatiárunum er fólkatalið minkað við næstan einum triðingi. Tey árini, tá ið arbeiðsloysið er lágt, og framgongd hevur verið í búskapinum, hevur oyggin klárað at hildið eitt støðugt fólkatal. Men tá búskaparligt mótrák er í landinum minkar fólkatalið, tí fólk flyta burtur. Talva 31 og 32.

Síðan 2014 hevur fólkatalið staðið í stað, og tað sær út sum fráflytingin er steðgað, og vend til eina lítla tilflyting. Men stóra og áhaldandi fráflytingin hevur havt við sær, at fá fólk nú eru í teimum aldursbólkum, har fólk fáa børn. Burðaravlopið hevur tí fyri tað mesta verið negativt seinastu árini. Skal fólkatalið vaksa skal munandi tilflyting til. Komandi Sandoyartunnilin, ið møguliga letur upp í 2023, fer at hava við sær, at Sandoyggin gerst partur arbeiðsmarknaðinum í miðstaðarøkinum. Hetta fer uttan iva at økja munandi um tilflytingina, og eisini um skattainntøkurnar hjá kommununum í oynni.

**Talva 31**

Fólkatal í Sandoynni - 1985-2020




**Talva 32**

| Sandoy 2014-2019 | |
|---|---|
| Burðaravlop | -11 |
| Nettoflyting uttanlands | 7 |
| Nettoflyting innanlands | -2 |
| **Vøkstur íalt** | **-6** |
| **Vøkstur í miðal árliga** | **-1** |

**Talva 33**

Fólkatal í Suðuroynni - 1985-2020




**Talva 34**

| Suðuroy 2014-2019 | |
|---|---|
| Burðaravlop | -33 |
| Nettoflyting uttanlands | 101 |
| Nettoflyting innanlands | -116 |
| **Vøkstur íalt** | **-48** |
| **Vøkstur í miðal árliga** | **-8** |





*Sumba*

## Suðuroy

Fólkatalið í Suðuroy hevur verið í støðugari minking. Eins og í Sandoynni kom fólkatalið í Suðuroynni ongantíð fyri seg aftur aftaná kreppuna í nítiárunum. Støðuga afturgongdin er tó javnað út seinastu árini og fólkatalið liggur nú støðugt um 4.600 fólk.

Høvuðsorsøkin til gongdina í fólkatalinum í Suðuroynni er frástøðan til arbeiðsmarknaðin í meginøkinum. Tað ger tað torført at búgva í Suðuroy og arbeiða í miðstaðarøkinum. Hetta hevur við sær at fólk flyta burtur, og hevur eisini við sær, at fólk ikki flyta aftur til oynna eftir lokna útbúgving. Talva 33 og 34.

Síðan 2014 er fólkatalið minka við 48 fólkum. Minkingin stavar frá serliga frá innlendskari fráflyting. Síðan 2014 eru 116 fleiri flutt norður um Suðuroyarfjørð, enn tað eru flutt suður um. Eins og í Sandoynni, so gevur burðaravlopið ikki longur nakað íkast til vøksturin í oynni. Burðaravlopið síðan 2014 er -33. Hinvegin so hevur oyggin rættiliga stóra tilflyting úr útlandinum. Síðan 2014 eru 101 fleiri fólk flutt til Suðuroyar úr útlondum enn tað eru flutt úr Suðuroynni í útlond.

Samanumtikið er ein minking í fólkatalinum í Suðuroynni frá 2014 til 2019, men munur er á gongdini. Meðan flestu kommunur hava eina minking í fólkatalinum í tíðarskeiðinum 2014-2019, so er ein lutfalsliga stórur vøkstur í Vágs kommunu á umleið 3%.

# TEMA:

# 15. Búskaparligi bygnaðurin hjá kommununum

**Inngangur**
Almenni geirin í Føroyum kann býtast upp í fýra ymiskar partar: Landið, Kommunurnar, Sosialu grunnarnar og Ríkismyndugleikarnar. Gongdin seinastu mongu árini hevur verið tann, at parturin hjá landinum og ríkismyndugleikunum er minkaður í vavi, meðan parturin hjá sosialu grunnunum og kommununum er øktur.

Sosialir grunnar sum ALS, AMEG, Barsilskipanin, Trygdargrunnurin og Vinnusjúkugrunnurin – sum ikki vóru til fyri 30 árum síðani – umsita í dag ein stóran part av almennu veitingunum. Hinvegin hava kommunurnar yvirtikið rakstraruppgávur sum barnaansing, barnavernd og eldrarøkt.

At kommunurnar hava yvirtikið júst hesar uppgávur er í nógvar mátar sjálvsagt, tí talan er um uppgávur, sum natúrliga hóska betur til lokalar myndugleikar enn til ein landsmyndugleika, og yvirskipað má sigast, at hesar útleggingar umsitingarliga hava eydnast væl. Eisini fíggjarliga hava kommunurnar higartil klárað at lyft uppgávuna.

Men hinvegin má ásannast, at yvirtøkan av eldraøkinum hevur havt við sær, at ein munandi partur av almennu fíggjarligu haldførisavbjóðingini er flutt frá landskassanum og yvir í kommunukassarnar, og tað verður helst ikki so leingi, so fer at sansa at fíggjarliga.

Greitt verður nærri frá hesi avbjóðing niðanfyri, og hugt verður eftir møguleikum fyri loysnum.

**Inntøkubygnaður hjá kommunum**
Inntøkubygnaðurin hjá kommununum er soleiðis, at umleið ¾ av inntøkunum stava frá kommunuskatti, 5% frá felagsskatti, 15% frá eftirlønarskatti og umleið 5% frá afturbering vegna serskipanir.

Alt inntøkugrundarlagið má – so ella so – sigast at vera inntøkuskattur. Kommunuskattur verður rindaður beinleiðis av skattskyldugu inntøkuni. Eftirlønarskattur verður goldin av tí partinum av inntøkuni, ið fer til eftirløn. Felagsskattur er álíknaður skattskyldugu inntøkuni hjá feløgum, og afturberingin verður útroknað eftir tí partinum av inntøkuni, sum ikki verður mett sum vanlig skattskyldug inntøka sambært skattalóggávuni.

Kommunuskatturin er einasta inntøkan, ið kommunurnar sjálvar kunnu ávirka. Kommunan kann áseta skattaprosentið og barnafrádráttin. Men sjálvt grundarlagið undir skattinum – skattaskylduga inntøkan og botnfrádrátturin – hevur kommunan onga ávirkan á. Tað vil siga, at kommunan kann áseta, hvussu nógv skal rindast. Men kann ikki áseta, hvør ið skal rinda, ella av hvørjari inntøku rindast skal, tí skattagrundarlagið er tað sama sum undir landsskattinum.

Hetta at deila skattagrundarlag við landsskattin, hevur í ofta víst seg óheppið, tí tað hevur stundum havt við sær, at landspolitikkarar, ið hava viljað hjálpt ávísum samfelagsbólkum fíggjarliga, við at játta skattafrítøku hava kunnað brúkt kommunukassan til at rinda ein stóran part av lættanum.

Gongdin hevur havt við sær, at fyritíðarpensjónistar í dag næstan ongan kommunuskatt rinda. Um fyritíðarpensjónin varð gjørd fult skattskyldug og hækkað soleiðis, at fyritíðarpensjónisturin fekk sama útgoldið eftir skatt, høvdu kommunurnar fingið umleið 52 mió. kr. meira inn í skattainntøkum.

Hjá fólkapensjónistum hevur gongdin verið tann sama. Ein fólkapensjónistur, ið einans hevur fólkapensjón og Samhaldsfasta at liva av, rindar í dag lutfalsliga lítið í kommunuskatti. Um fólkapensjónin varð gjørd fult skattskyldug og hækkað soleiðis, at fólkapensjónisturin fekk sama útgoldið eftir skatt, høvdu kommunurnar fingið umleið 108 mió. kr. meira inn í skattainntøkum.

Tað vil siga, at kommunurnar missa samanlagt 160 mió. kr. vegna tað, at fólka- og fyritíðarpensjón ikki rinda fullan skatt. Hetta hevur stórar fíggjarligar avleiðingar fyri tær kommunur, har nógvir fólka- og fyritíðarpensjónistar búgva. Tíverri vísir tað seg at hanga saman soleiðis, at tey øki, har nógvir fólkapensjónistar eru, har eru eisini nógvir fyritíðarpensjónistar. Eisini eru hetta í stóran mun tey øki við hægri arbeiðsloysi, lægri miðalinntøku og sum fáa lítið inn í felagsskatti. So hesin ósiður at hjálpa pensjónistum gjøgnum skattaskipanina rakar veikastu kommunurnar serliga meint.

Serliga Sandoyggin og Suðuroyggin eru fyri stórum fíggjarligum missi. Vóru almennu pensjónirnar hækkaðar og gjørdar fult skattskyldugar, soleiðis at pensjónisturin fekk sama útgoldið eftir skatt, hevði tað havt við sær, at skattaprosentið í miðal fyri alt landið kundi lækka við gott 1,5%. Í Suðuroynni kundu skattaprosentini lækka við 2,75% og í Sandoynni meira enn 3%.

Hetta at rinda almennar veitingar umvegis skattaskipanina má sigast at verða fakliga ógrundað. Eisini er tað eitt dømi um eina politiska skipan, ið er merkt av "kassahugsan", og sum ikki hugsar um samlaða almenna búskapin, og ikki hevur fyrilit fyri veikastu økjunum í landinum, tá ið lóggivið verður.

**Útreiðslubygnaður hjá kommunum**
Í stuttum kann sigast, at rakstrarútreiðslurnar hjá kommununum eru soleiðis, at ¼ fer til eldraøkið, samanlagt ¼ fer til barnaansing (20%) og barnavernd (5%), meðan restin (½) fer til ymiskt annað virksemi.

Annað virksemi fevnir um allar tær rakstraruppgávur, sum kommunurnar høvdu áðrenn eldraøkið, barnavernd og barnaansing var lagt út. T.d. fyrisiting, renovatión, reinhald, gøtuljós, svimjihallir og mangt annað. Her er talan um økir, sum eru lutfalsliga løtt at umsita og fíggjarstýra. Til hesi økir er inntøkubygnaðurin væl egnaður. Her er lætt at raðfesta innanfyri karmin, og talan er fyri tað mesta um tænastur, har kommunurnar ikki eru lógarbundnar at veita ein ávísan kvalitet ella eina ávísa mongd. Einans helvtin av útreiðslunum til hesi økir samanlagt eru lønarútreiðslur.

Barnavernd og barnaansing eru tyngri økir at umsita og stýra, og stórur partur er lønarútreiðslur. Eisini er talan um lógarbundnar tænastur. Men hinvegin so hanga økini væl saman við inntøkubygnaðinum. Tað er í síðsta enda barnatalið, sum avger útreiðslurnar, og har nógv børn eru, har eru eisini nógvir skattgjaldarar í bestu árum, og harvið eitt gott skattagrundarlag. So hóast økini eru fíggjarliga tung, so hava tey ikki stórvegis fíggjarligar avbjóðingar við sær, tí samanhangur er millum inntøkur og útreiðslur.

Eldraøkið má eisini sigast at verða eitt tungt øki at umsita. Talan er fyri tað mesta um lønarútreiðslur og nógv av tænastuni er lógarbundið. Men tað má sigast, at kommunurnar hava loftað økinum væl. Økið er skipað í samstørv, sum eru farin at virka sera væl.

Men hinvegin kann longu nú sigast, at eldraøkið sum frálíður fer ikki at hóska til núverandi inntøkubygnað hjá kommununum. Tí her er als ikki samanhangur millum útreiðslur og inntøkur sum frálíður. Talið av eldri fer at vaksa nógv komandi 40 árini, og roknast kann ikki við nøkrum stórvegis vøkstri í inntøkugrundarlagnum sum frálíður.

Kommunurnar yvirtóku eldraøkið 1. januar 2015. Til at reka økið fingu kommunurnar allan skattin av inngjøldum til eftirløn, og harumframt eina afturbering fyri serskipanir og frádráttir. Harumframt komu so inntøkur frá brúkaragjøldum, og ein serskipan (endurrindan) fyrstu tvey árini til økir, har fíggingarleisturin ikki hóskaði so væl til eldraútreiðslurnar í økinum. Hinvegin so yvitók landið tann partin av skattinum av kapitalpensjónum, sum kommunurnar høvdu fingið frammanundan. Talva 35.

Eftirlønarskatturin var bulurin í fíggingini. Hann verður latin kommunum eftir tali av borgarum 67 ár og eldri, tó soleiðis, at parturin hjá kommununum í Sandoynni er 30% størri.

Her er vert at gera vart við, at fíggingarleisturin fyri ein stóran part var inntøkur, sum kommunurnar áttu frammanundan. Eftirlønarskatturin, ella forskattingin, var sett í verk í 2012. Frammanundan var skattur rindaður tá eftirlønin varð útgoldin, so tá áttu kommunurnar gott og væl helvtina av skattinum. Tá forskattingin varð sett í verk fór allur skatturin beinleiðis í landskassan. Viðvíkjandi afturbering fyri serskipanir, so var eisini talan um afturbering av skatti fyri skipanir, sum landið hevði sett í verk, uttan at veita kommununum endurgjald fyri mistar inntøkur. So samanumtikið má sigast, at næstan 2/3 av fíggingini eru pengar, ið kommunrnar søguliga áttu rætt til at fingið frammanundan.

Sagt varð tá, at eftirlønarskatturin fór at vaksa við 50% fram til 2029 vegna hækkingina í bundna gjaldinum sambært eftirlønarlógini. Her er tó eisini vert at gera vart við, at helvtina av nevndu hækking á 50% eru inntøkur, sum kommunurnar eiga frammanundan. At meira verður rindað til eftirløn, hevur við sær, at skattskylduga inntøkan minkar við somu upphædd, tí frádráttur er fyri inngjøld til eftirløn. So vøkstur í eftirløn hevur einans við sær, at kommunurnar nú fá 40% í eftirlønarskatti í staðin fyri 20% í kommunuskatti. Tað vil siga, at fyri hvørjar 100 kr., ið eftirlønarskatturin veksur, so minkar kommunuskatturin við 50 kr.

Higartil má vøksturin í eftirlønarskattinum sigast at hava fylgt teirri meting, ið tá varð gjørd. Men óvíst er tó, um henda meting fer at halda sum frálíður. Fyri tað fyrsta, so lækkaði undanfarna samgonga bundna gjaldið úr 15% niður í 12%, umframt at tey lækkaðu skattin fyri lægru inntøkurnar. Harumframt er eisini óvist, um stóri inntøkuvøksturin, sum hevur verið síðan 2015 – og sum í stóran mun stavar frá fólkavøkstri – kann halda fram, serliga nú Covid-19-kreppan ger seg galdandi. Men óansæð gongdina, so er tað snøgt sagt ógjørligt, at fíggingarleisturin kann fíggja tann vøkstur í útreiðslunum, sum er fyri framman. Til tað er komandi útreiðsluvøksturin alt ov stórur.

Ilt er at spáa heilt neyvt um útreiðslurnar innan eldrarøktina frameftir, men eitt gott boð, ella ábending, fæst við at hyggja at gongdini í talinum á fólki, ið eru 80 ár og eldri. Fólk, ið fáa eldrarøkt, kunnu hava rættiliga ymiskan aldur, men talan er í rættiliga stóran mun um fólk, ið eru 80 ár og eldri. Miðalaldurin á fólki, ið fáa heimatænastu er 80-81 ár, og miðalaldurin á fólki, tá tey flyta inn í ein røktarbústovn er 84-85 ár. Talið av fólki omanfyri 80 ár má tí sigast at vera gott gott mát fyri tørvin á eldrarøkt í samfelagnum. Talva 36 og 37 á næstu síðu.

Myndin niðanfyri vísir árliga vøksturin í talinum á fólki,

Talva 35

| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| Endurrindan fyri DIS/FAS inntøkur | 113 | 116 | 115 | 113 | 109 |
| Avgjald av kapitaleftirlønum | -18 | -23 | -17 | -20 | -19 |
| Skattur av pensjónsinngjøldum | 277 | 296 | 321 | 352 | 398 |
| Brúkaragjøld | 49 | 51 | 51 | 52 | 52 |
| Endurrindan til ávísar kommunur | 25 | 13 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans, brutto (mió. kr.)** | **446** | **453** | **470** | **497** | **539** |

sum eru 80 ár og eldri frá ár 2000 og fram til 2060. Sum víst, so fer talið av fólki, ið eru 80 ár og eldri at vaksa sera skjótt frá 2022 og frameftir. Vøksturin fer frá at hava verið umleið 30 árliga til at verða umleið 100 árliga. Vøksturin stendst av, at stóra talið av fólki, sum vóru fødd frá seinna heimsbardaga og til seinast í sekstiárunum, tá byrja at gerast meira enn 80 ára gomul.

Í dag eru gott 2.200 fólk, ið eru 80 ár og eldri. Hetta fer at vaksa upp í meira enn 6000 fólk sum frá líður.

Hinvegin verður ongin vøkstur í talinum á fólki, ið eru 16-66 ára gomul, og sum eru bulurin í skattagrundarlagnum hjá kommununum. Myndin niðanfyri vísir gongdina í talinum av fólki omanfyri 80 ár og gongdina í talinum á 16-66 ára gomlum, har talið í 2020 verður sett til 100. Broytingin lýsir sostatt lutfalsliga vøksturin.

Sum víst so veksur talið av fólki 80 ár og eldri við meira enn 50% bara tey komandi 10 árini, og komandi 20 árini fer talið at tvífaldast. Um 35-40 ár verður talið av fólki í røktarkrevjandi aldri umleið 2,7 ferðir størri enn í dag. Hinvegin er ongin vøkstur í talinum á 16-66 ára gomlum. Talið stendur so at siga í stað. Talva 38.

Niðanfyri verður hugt eftir, hvat stóri vøksturin av fólki í røktarkrevjandi aldri fer at hava við sær fyri útreiðslurnar á eldraøkinum frá 2015 til 2060. Framskrivingin er gjørd

**Talva 36**

Árligur vøkstur í talinum av fólki 80 ár og eldri, 2000-2060




**Talva 37**

Tal av fólki 80 ár og eldri, 2000-2060




**Talva 38**

Vøkstur í tal av fólki 80 ár og eldri og 16-66 ár. Index, 2020=100.








*Røktarheimið á Mørkini í Streymnesi*

soleiðis, at talið av fólki 80 ár og eldri verður faldað við miðalkostnaðinum í 2015. Sum víst vaksa útreiðslurnar úr umleið 450 mió. kr. upp í tað sum í nútíðarkrónum samsvarar við 1,2 mia. kr.

Myndin vísir eisini fíggingarleistin fyri eldraøkið, sum hann av Fíggjarmálaráðnum var mettur at vera í 2014. Sum víst, so er fíggingin væl hóskandi tey fyrstu árini, tí tá er vøkstur í inntøkunum vegna árliga vøksturin í bundna gjaldinum, og tá er eisini minni vøkstur í talinum á fólki omanfyri 80 ár. Men longu frá umleið 2030 verður vaksandi undirskot. Nú er ikki longur vøkstur í inntøkunum, tí talið av 16-66 ára gomlum stendur í stað, men hinvegin er støðugur vøkstur í talinum á fólki 80 ár og eldri. Sum víst hevur gongdin við sær, at undirskotið veksur upp í 600 mió. kr. sum frá líður. Talva 39.

Samanumtikið kann sigast, at tað er púra greitt, at yvirtøkan av eldraøkinum hevur havt við sær, at kommunali búskapurin ikki longur er fíggjarliga haldførur sum frálíður. Verða ongar broytingar gjørdar, fer fíggjarliga haldførið hjá kommununum at versna komandi 40 árini við einari upphædd, sum samsvarar við umleið 600 mió. kr.

**Talva 39**

Fíggingarleistur í mun til eldraútreiðslur 2015-2060 (mió. kr.)



**Metingar um loysnir**

Niðanfyri verður hugt eftir, hvørjir møguleikar eru fyri at loysa haldførisavbjóðingina, sum eldraøkið hevur við sær fyri kommunurnar. Ongin av loysninum niðanfyri kann einsamøll loysa avbjóðingina, men við fleiri átøkum ber til at koma nær málinum.

*Umskipan, tøkni og fyribyrging*

Tað er greitt, at ein partur av avbjóðingini kann loysast við at skipa røktina øðrvísi sum frálíður. Har eru møguleikar fyri at minka um partin av gomlum, sum eru fast á stovni við ymiskum øðrum bíligari tilboðum: eldrabústaðir, stutttíðarpláss á stovni, dagtilboð o.a. Eisini eru møguleikar innan vælferðartøkni og fyribyrgjandi heilsuátøk.

*Sparingar og hægri egingjøld*

Tænastan er í dag á einum lutfalsliga høgum støði. So tað ber í ein ávísan mun til at spara, men hetta merkir sjálvandi verri tænastu. Eisini leggur tað størri trýst á avvarðandi og trivnaðurin hjá teimum eldru og starvsfólkunum versnar. Eisini ber til í ein ávísan mun at økja um egingjøldini fyri heimatænastu og fyri at búgva á stovni o.a.

*Bruttoficering av fólka- og fyritíðarpensjón*

Sum nevnt frammanfyri er tað soleiðis í dag, at fyritíðarpensjónistar og fólkapensjónisstar rinda lutfalsliga lítið í kommunuskatti. Um fólka- og fyritíðarpensjónin varð gjørd fult skattskyldug og hækkað soleiðis, at fólkapensjónisturin fekk sama útgoldið eftir skatt, høvdu kommunurnar fingið 160 mió. kr. meira í kommunuskatti. Havandi í huga, at talið av fólkapensjónistum fer at vaksa umleið 70% komandi 40 árini, verður talan um betring í haldførinum á umleið 225 mió. kr. Ein slík "bruttoficering" av fólka- og fyritíðarpensjón hevði eisini vent beint á tann hátt, at inntøkurnar serliga høvdu komið teimum økjum í landinum til góðar, sum eru ringast fyri fíggjarliga, og har flest eldri búgva.

*Kommunurnar fáa part av tilfeingisinntøkunum*

Seinastu 10 árini hevur landskassin tryggja sær eina munandi avgjaldsinntøku frá fiski- og alivinnuni. Í 2019 var talan um meira enn eina hálva milliard kr. samanlagt í avgjøldum á fiskatilfeingi og tøkugjaldið á alivinnu. Her er talan um nýggjar inntøkur, men tað er greitt at talan er í stóran mun um inntøkur, sum eru tiknar burturúr skattagrundarlagnum undir partafelagsskattinum og lønarskattinum. Kommunurnar hava sostatt óbeinleiðis rinda ein part av hesum inntøkum. Tað vildi tí ikki verið órímiligt, at kommunurnar fingu ein part av hesum avgjøldunum. Verða hesi rindað komununum eftir talinum av eldri borgarum, kundi hetta verið við til at minka um haldførisavbjóðingina.

*Botnfrádrátturin í kommunuskattinum verður avtikin stigvíst*

Botnfrádrátturin í kommunuskattinum er 30.000 kr. Útjavning av inntøkum, tað vil siga, umfordeiling millum háinntøkur og láginntøkur, má sigast at vera ein landsuppgáva og ikki ein kommunal uppgáva. Tí er spurningurin um tað er neyðugt at kommunuskatturin hevur ein botnfrádrátt. Varð botnfrádrátturin í kommunuskattinum avtikin stigvíst, t.d. við eini lækking á 1000 kr. árliga komandi 30 árini, vildi tað givið kommunum tað sum í dag samsvarar við 250 mió. kr. í eyka inntøkum, og kundi sostatt minkað haldførisavbjóðingina við umleið 40%.

*Hækkingar í kommunuskattaprosentinum*

Sum áður sagt er kommunuskattaprosentið einasta veruliga fíggjarliga amboð kommunurnar hava. So í tann mun onnur átøk ikki koma í staðin, so hava kommurnar bara eittans loysn, og tað er at hækka skattaprosentið. Skal øll haldførisavbjóðingin loysast við hækking av skattaprosentinum, verður talan um hækking í miðalskattaprosentinum á 5-6%. Í teimum økjum, ið eru ringast fyri fíggjarliga, verður helst talan um eina væl størri hækking.